SEV

Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2018

# Vegurin slóðaður fyri grønum framburði



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

**Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2018**
Ársaðalfundur 24. apríl 2019
Myndir: Ólavur Frederiksen, Jens Kristian Vang, Finnur Justinussen, Alan Brockie, Høgni í Jákupsstovu, Minesto, Høgni Heinesen, Landsbyggifelagið, Kári Durhuus, Benjamin Rasmussen, Otto West, Pauli Djurholm, Eyðna J.M. Joensen og SEV.

Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit

Frágreiðing frá nevndini . . . . . . . . . . 2
Bygnaður . . . . . . . . . . 9
Vegurin slóðaður fyri grønum framburði . . . . . . . . . . 10
Orkukanning mælir til sól og vind . . . . . . . . . . 12
Rúm fyri bæði almennum og privatum
í føroysku elskipanini . . . . . . . . . . 14
Grøna elorkan sløk 49 prosent í 2018 . . . . . . . . . . 18
Óvanliga stórur vøkstur í elnýtsluni . . . . . . . . . . 19
Royndir við sjóvarfalsturbinum í Vestmannasundi . . . . . . . . . . 20
Sólorka í Sumba . . . . . . . . . . 26
Sundsverkið fingið altjóða góðkenning
fyri gott arbeiðsumhvørvi . . . . . . . . . . 28
Fyrsta stóra HTU-málið er rokkið . . . . . . . . . . 33
Starvsfólk skulu vera tilvitað um KT-trygdina . . . . . . . . . . 36
Reint og trygt Sundsverk . . . . . . . . . . 38
Fossáverkið framleitt elorku í 65 ár . . . . . . . . . . 42
Avmynstring – góðir vanar í góðari tíð . . . . . . . . . . 45
Starvsfólkini hjá SEV . . . . . . . . . . 48

**Ársfrágreiðing & ársroknskapur 2018**

Upplýsingar um felagið . . . . . . . . . . 58
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . 59
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . 60
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . 62
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . 63
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . 77
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember . . . . . . . . . . 80
Fíggjarstøða 31. desember . . . . . . . . . . 81
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . 83
Virkisbýti, framleiðsla og net . . . . . . . . . . 84
Rakstrarbýti, framleiðsla og net . . . . . . . . . . 87
Notur . . . . . . . . . . 89

# Frágreiðing frá nevndini

Góð fýra ár eru liðin, síðani SEV setti grønu kósina, sum landsstýrið seinni tók undir við: *"100 prosent grøn elorka á landi í Føroyum í 2030"*. Tað tykist, sum føroyingar flestir hava tikið undir við grøna málinum, og samstundis hevur tikið seg upp bæði politiskt og vinnuligt kjak um, hvussu vit røkka hesum framsøkna máli.

Nógvir eru vegirnir, sum kunnu føra okkum á mál, men SEV er av teirri sannføring, at úr einum samfelagsgagnligum sjónarhorni hevur tað sera stóran týdning at halda fast um, at elorkan í Føroyum skal verða trygg, bílig og grøn. Hesar eiga at vera fortreytirnar hjá teimum, sum ynskja at virka á grønu kósini, og sum harvið ynskja at byggja nýggja partin av samfelagnum, ið verður grundaður á varandi orkukeldur.

SEV hevur fyrireikað seg væl at halda fram á grønu kósini. Vit hava áður nevnt varðagøtuna, sum skal leiða føroyska samfelagið á mál. Grøna kósin skal búnast, so vit fáa fleiri leiðir at røkka sama máli. Nevnd, leiðsla og starvsfólk stevna áhaldandi fram ímóti settum partsmálum í hesi 11 ára longu virkisætlan, har búskaparliga gongdin og tilvitanin um týdningin av kjarnuveitingunum hjá SEV hava alstóran týdning fyri at røkka grøna málinum.

Virksemið hjá SEV síðani seinasta ársaðalfund verður lýst nærri í hesi frágreiðing, har nevndin lýsir tey mál, sum nevndin metir hava størstan áhuga hjá eigarunum. Frágreiðingin verður latin sambært grein 3, stk. 12b, og grein 4, stk. 11a í viðtøkum felagsins.

### Bulurin í elskipanini

Grøna kósin hevur við sær stórar útbyggingar í elskipanini, og grøna visiónin frá 2014 førdi til ítøkiligu langtíðar virkisætlanina, ið var staðfest við orkukanningini, "Energilagring på Færøerne, 2018". Kanningin tekur støði í kendum tøkniligum møguleikum, og hvussu tað búskaparliga best loysir seg at byggja út føroysku elskipanina. Kanningin vísir, at grønu útbyggingarnar eru búskaparliga besta valið. Sambært virkisætlanini skulu vindorka og sólorka byggjast út næstu árini, eins og ætlanin eisini er at byggja pumpuskipan.

Samstundis sum bygt verður út við grønum orkukeldum, er týðandi at vera tilvitaður um kjarnuvirksemið hjá SEV, ið er at halda veitingarskylduna og standa fyri veitingartrygdini við einum skynsomum rakstri øllum brúkarum at gagni. Tí reka, styrkja og víðka vit áhaldandi netið. Vit halda eina støðuga elveiting við høgari elgóðsku. Hesar kjarnuveitingar fáast í dag



*Nevnd og leiðsla frá vinstru: Jón Nielsen, deildarstjóri, Jónsvein Hovgaard umboðandi Suðuroynna, Heri Mortensen, deildarstjóri, Marin Katrina Frýdal umboðandi Tórshavnar kommunu, Kristian Eli Zachariasen umboðandi Norðoyggjar, Hans Jákup Johannesen, næstformaður, umboðandi Eysturoynna, Sune Jacobsen umboðandi Vágoynna, Bogi Bendtsen, deildarstjóri, Hákun Djurhuus, stjóri, John Zachariassen, nevndarformaður, umboðandi Norðstreymoy og Vinjard Tungá umboðandi Sandoynna.*

frá oljuverkunum og vatnorkuni, men tá ið oljuverkini í 2030 bert verða brúkt sum tiltakstrygd, verða vatnorkuverkini við pumpuskipan saman við elnetinum bulurin í allari elskipanini. Tað hevur alstóran týdning fyri eina trygga elveiting í Føroyum, at kjarnuveitingarnar framhaldandi verða saman í einari sterkari eind, sama hvørjar broytingar politiska skipanin annars ynskir at gera á elorkuøkinum í komandi tíðum.

SEV skal støðugt vera kjarnin í elskipanini undir virðisorðunum "Samstarv, Eldhugi og Virðing", og við støði í hesum virðum halda okkara dugnaligu starvsfólk fram at taka við teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman, og tey seta sær áhaldandi nýggj og avbjóðandi mál. Bæði tá ið talan er um grønar útbyggingar og eina trygga elskipan, sum eisini skal vera bílig, so eru dugnalig, ágrýtin og álítandi starvsfólk mergurin í føroysku elskipanini. Sama hvussu nógv kopar og sjálvstýrandi, tøknifrøðiligar loysnir, vit fylla inn í elskipanina, so verður skipanin ongantíð betri enn tey fólkini, sum við sínum dygdum og førleikum stýra elskipanini. Nevndin fegnast um, at SEV hevur ein væl samansettan starvsfólkahóp, ið áhaldandi søkir nýggjastu vitanina, og hevur starvsroyndir, sum tilsamans strekkja seg yvir fleiri tíggjuáraskeið.

## Fyrireikandi stig

Fleiri fyrireikandi kanningar eru gjørdar av elorkuøkinum seinnu árini. Allar tær fyrireikingar, sum eru farnar fram, síðani vit settu grønu kósina í 2014, hava havt við sær, at vegurin nú er slóðaður fyri grønum framburði. Fyrsti teinurin á varðagøtuni er gingin, og tað er frameftir ein spurningur um at hava greiðar spælireglur og lyfta í felag fyri at røkka málinum.

Orkupolitiska ætlanin "Einar grønari Føroyar í 2030" varð handað Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í orkumálum, í juni 2018. SEV, sum hevur havt umboð í arbeiðsbólkinum, tekur undir við ætlanini. Í frágreiðingini verður víst á, hvussu til ber at røkka málunum, ið landsstýrið hevur sett.

Áður nevnda orkukanning, "Energilagring på Færøerne, 2018", sum Umhvørvisstovan í august í 2018 læt landsstýriskvinnuni í orkumálum, er gott grundarlag at byggja á, tá ið næstu stigini skulu takast fram ímóti 100 prosentum varandi orku her á landi í 2030. Kanningin er gjørd í samstarvi millum Orku á Umhvørvisstovuni, SEV og Dansk Energi, umframt at ráðgevandi fyritøkurnar Ea Energy Analyses og Norconsult hava gjørt simuleringar og greiningar í fleiri umførum.

# Frágreiðing frá nevndini

Nógva og stundum drúgva politiska kjakið um, hvørt elframleiðslan og elnetið hjá SEV eiga at skiljast sundur, fekk SEV at fyriskipa sína egnu kanning av hesum viðurskiftum. Serfrøðingar hjá Dansk Energi gjørdu kanningina fyri SEV, sum var almannakunngjørd 4. februar 2019. Taka vit stutt saman um tilmælini í kanningini, ber til at siga, at bæði SEV og privatir framleiðarar kunnu hava sín týðandi leiklut í framtíðar elskipanini í Føroyum. Í kanningini verður víst á, at nýggj elframleiðsla innan t.d. vind, sól og sjóvarfall eigur at verða boðin út í kapping, har orkumyndugleikin velur lægsta tilboðið samsvarandi útbjóðingartreytunum. Í sambandi við slík útboð verður mælt til, at orkumyndugleikin skal kunna velja SEV frá í útboðnum, um myndugleikin metir, at kappingin hevur verið nøktandi millum hinar partarnar, sum bjóða. Tá talan er um kjarnuveitingar, sum er tann parturin av elskipanini, ið áhaldandi tryggjar støðufestið og veitingartrygdina í elskipanini, vísa serfrøðingarnir tó á, at tað er skilabest, at SEV umsitur hendan partin.

## Politiska gongdin

Løgtingið heitti í uppskoti til samtyktar, mál nr. 075/2018, á landsstýrið *"um at leggja fyri løgtingið frágreiðing um, hvussu netið hjá SEV kann verða skilt frá hinum virkisøkinum soleiðis, at fult gjøgnumskygni verður í kostnaðinum av netpartinum."* Løgtingið heitti í hesum sama viðfangi á landsstýrið *"um at samskipa frágreiðingina við arbeiðið, sum er í gongd í landsstýrinum, í mun til at fáa sett munandi meira ferð á framleiðsluna av grønari orku - og í hesum sambandi at tryggja størri kapping á framleiðslu- og sølusíðuni, í tann mun tað gagnar brúkaranum og tænir endamálinum at røkka málinum um, at Føroyar í 2030 á landi burturav verða riknar við varandi orku."*

SEV var boðið á fund í Vinnunevndini, sum viðgjørdi málið. Í framhaldi av hesum læt SEV eisini Vinnunevndini kanningina frá Dansk Energi umframt fleiri viðmerkingar til málið.

Málið var samtykt 6. mars 2019 við 27 atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti. Nevndin tekur væl ímóti samtyktini og tí frágreiðing, løgtingið biður um. Okkara vón er, at ein slík frágreiðing kann vera við til at stimbra kjakið og geva sakligar orsøkir fyri og ímóti einari møguligari sundurskiljing av neti og framleiðslu.

Tað er sostatt støðugur politiskur áhugi fyri broytingum í elskipanini. Einstakir politikarar vilja sundurskiljing av elfelagnum og ein frían elmarknað við framleiðarum og handilsfeløgum, sum hava beinleiðis samband við sínar kundar uttan um SEV. Serfrøðingarnir hjá Dansk Energi, sum gjørdu áður umrøddu kanning, meta, at ein slík skipan hækkar elprísin 9-15 oyru/kWt.

Nevnd og leiðsla hava samskift við politisku flokkarnar og eigararnar um hesi viðurskifti, hetta fyri at skapa eina betri fatan av áskoðanunum hjá hvørjum øðrum. SEV tekur undir við skilagóðum broytingum, og tað er m.a. eisini orsøkin til, at SEV hevur biðið um áður nevndu frágreiðing um møguliga sundurskiljing av netinum og framleiðsluni. Tað er umráðandi at fara fram við skili, og tí er eisini týdningarmikið, at allar kommunur sum eigarar av SEV staðfesta sín rætt og virka fyri, at avgerðir verða tiknar til frama fyri føroyska samfelagið – t.d. við at tryggja kapping um øll vindorkuútboð.

Í teimum trimum útboðunum í Neshaga, í Húsahaga og oman fyri Þorkeri hevur SEV bjóðað lægsta prísin at framleiða elorku. Tí leggur nevndin doyðin á framhaldandi at vera við í komandi útboðum fyri at tryggja elbrúkaranum lægst møguligan elprís.

Bæði í tinginum, í fjølmiðlunum og millum serfrøðingar hevur orkuøkið áhuga. Tá Sosialurin viðgjørdi orkuøkið í blaðnum 25. februar 2019, var Bogi Hansen, havfrøðingur, endurgivin soleiðis: *"Bogi Hansen heldur, at landið eigur at gera ítøkilig átøk fyri at skunda undir grønu kósina. – Fyri tað fyrsta skal landið fara inn og hjálpa SEV til at útbyggja elnetið í staðin fyri at seta teimum forðingar í vegin, sum politikararnir royna at gera nú, sigur hann. Hann heldur eisini, at tað er ein gongd leið at gera tað lættari og bíligari hjá fólki at velja grønar loysnir sum umhvørvisvinarligar bilar, jarðhita og fjarhita".*

Sama hvør politiska gongdin verður, og sama hvørjar ætlanir liggja aftan fyri møguligar politiskar broytingar á elorkuøkinum, so er týdningarmikið at halda fast um kjarnuveitingarnar í einari sterkari eind, og at høvuðsendamálið eigur at verða trygg, bílig og grøn elorka til brúkaran, vinnulívið og alt tað føroyska samfelagið.

Nevndin vónar, at tær kanningar, sum eru og verða gjørdar av elorkuøkinum, saman við einum uppbyggjandi politiskum orðaskifti flyta bæði brúkaran, samfelagið, vinnulívið og SEV fram eftir grønu kósini, so at vit røkka málinum í 2030.

## Brúkarin

Fyri at stuðla undir visiónina at gerast 100 prosent grøn á landi í 2030 er alneyðugt, at brúkararnir frameftir skifta til elloysnir, tá ið talan er um upphiting og flutning. Tiltøkini hjá landinum við MVG-frítøku fyri keyp av hitapumpum og elbilum o.ø. – saman við lægri elprísum til nevndu nýtslubólkar – gera mun.

Nevndin hevur ásett nýggjar treytir og prísir fyri sølu av elorku til hitapumpur og elbilar – 1,39 kr/kWt íroknað MVG – tað er 0,50 kr/kWt lægri enn hægsti elprísurin. Elveitingareftirlitið góðkendi prísirnar, sum komu í gildi 1. apríl 2019.

Politiska skipanin eigur tó eisini at hava í huga, at omanfyri nevndu stuðulskipanir gera seg inn á kappingarførið hjá P/F Fjarhitafelagnum, sum longu er ein grøn hitaloysn.

Brúkarin skal hava møguleikan fyri tøttum samskifti við SEV, og elfelagið fer tí at gerast sjónligari við at førka seg inn á nútíðar samskiftispallar, har brúkararnir ferðast hvønn dag. Vit miða eftir at gerast ein natúrligari partur av tilvitskuni hjá brúkarunum. Brúkarin skal kunna hava SEV í lummanum soleiðis, at brúkarin altíð í einari handarvend kann søkja sær ráð, vegleiðing og upplýsing hjá SEV.

Brúkarin skal verða í miðdeplinum. Júst tað er vert at leggja sær í geyma í hesum tíðum, har alsamt fleiri áhugamál stinga seg upp.

## Pumpuskipan í Vestmanna

Við støði í kanningini "Energilagring på Færøerne, 2018" hevur SEV tikið upp aftur málið um pumpuskipan í Vestmannaøkinum vísandi til umsóknina, sum av fyrstantíð var send orkumyndugleikanum 13. november 2013. Í skrivi dagfest 31. august 2018 verður biðið um loyvi at gera pumpuskipanina við nýggjum orkuverki inni í fjallinum millum Heygabyrgingina og Mýrabyrgingina. Ætlanin er gjørd í stigum, har fyrsta stigið, ið skal takast í nýtslu í 2024, er eitt nýtt Heygaverk við 25 MW turbinum, eitt nýtt Mýraverk við 40 MW turbinum og 70 MW pumpum umframt nýggjum tunlum. Seinni ber eisini til at økja verandi vatngoymslur og harvið úrtøkuna við at byggja nýggjar byrgingar. So hvørt oljuverkini framleiða minni og minni, flytur kjarnuveitingin hjá SEV av Sundsverkinum til verkini í Vestmanna.

Talan er um eina sera stóra og slóðbrótandi verkætlan, sum verður krummtappurin í nýggju grønu elskipanini. Verkætlanin verður ikki framd eftir einum degi. Í umsóknini er ætlað, at projektering og myndugleikaviðgerð skulu vera liðug miðskeiðis í 2020. Henda verkætlanin verður avgerandi fyri, hvussu nógv vindorka fæst inn á elskipanina. Tað er alneyðugt, at borið verður skjótt at, soleiðis at pumpuskipanin ikki gerst ein fløskuhálsur á grønu kósini.

## Vindorkan í Suðuroy og heildarloysnin

Nevndin hevur valt at greina nærri, hvør besta heildarloysnin er fyri alla elskipanina. Henda avgerðin er tikin við støði í:

- at Sandoyartunnilin letur upp fyri einum 60 kV kaðli til Suðuroynna umvegis Sandoynna í 2024
- at pumpuskipanin oman fyri Vestmanna eftir ætlan verður sett í rakstur í 2024
- at Bakkafrost hevur avgjørt at byggja eina lívfiskastøð í Skálavík, ið krevur eina 60 kV elveiting í Sandoynni, og sum fyritøkan boðaði SEV frá seint í 2018
- at pumpuskipanin í Suðuroynni verður munandi dýrari enn upprunaliga mett og í fyrsta lagi kann takast í nýtslu í 2023

Arbeiðið greinar pumpuskipan í Suðuroy, sjókaðal til Suðuroynna ella báðar møguleikar í einari loysn. Greiningararbeiðið verður lagt fyri aðalfundin at viðgera. SEV noyddist, stutt áðrenn tilboðini skuldu vera inni, at vísa orkumyndugleikanum á nevnda greiningararbeiðið. Sostatt hevði omanfyri nevnda avgerð við sær, at neyðugt var at endurskoða vindútboðið í Suðuroynni, har lýst hevði verið við einum 12 MW útboði.

Nýggja støðan hevði við sær, at SEV tí í fyrstu atløgu mælti til 6 MW vindorku í Suðuroynni. Hetta ørkymlaði Magn, sum boðaði frá, at felagið tók seg úr kappingini at bjóða upp á vindorkuna í Suðuroynni, tí verkætlanin minkaði við eini helvt, eftir at SEV hevði lagt nýggju upplýsingarnar fram.

SEV harmaðist um, at Magn ikki vildi vera við, og tí vísti SEV beinanvegin á møguleikan at bjóða 12 MW út samlað í tveimum stigum soleiðis, at Magn kundi koma við aftur í kappingina. T.v.s. ein útbjóðing, sum ein og sami veitari hevði møguleika at vinna, men í tveimum byggistigum. Í tilgongdini í verkætlanini í Suðuroy hevur alla tíðina verið ætlanin at byggja út í tveimum stigum, har seinna helvt av teimum 12 MW var beinleiðis tongd at, at ein pumpuskipan var í rakstri. Orkumyndugleikin valdi tó at halda fast um 6 MW í endaliga útboðnum.

Tað var ein sera drúgv tilgongd at avgreiða vindorkuútboðið í Suðuroy. SEV fegnast kortini um, at orkumyndugleikin ásetti endaligu treytirnar og gjøgnumførdi útboðið, har SEV, tá avtornaði, átti tað lægra av tveimum tilboðum. 29. mars fekk SEV loyvi frá Umhvørvisstovuni at seta vindmyllur upp samsvarandi útboðnum.

## Onnur grøn átøk

Orka hevur lýst eftir umsóknum til eina 18 MW vindmyllulund á Eiði. Freistin at lata inn umsókn er 1. august 2019, og SEV fyrireikar tilboð.

# Frágreiðing frá nevndini

Harumframt er eitt útboð ávegis í meginøkinum á 18 MW, sum verður grundað á eina "open door" umsókn, staðsett í Hoyvíkshaganum. Leisturin fyri undanfarna "open door" útboð í Húsahaga í 2012, har allir umsøkjarar sambært elveitingarlógini skuldu kunna yvirtaka avtaluna, sum SEV hevði gjørt við festaran í Húsahaga, verður hesa ferð sambært orkumyndugleikanum broyttur til, *"at viðkomandi umsøkjari skjalprógvar atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar"*. Hetta merkir, at bert tann umsøkjarin, sum frammanundan hevur eina avtalu við festaran í Hoyvíkshaganum, kann bjóða. Við øðrum orðum er kapping útihýst úr Hoyvíkshaganum.

Orka og SEV hava staðsett fimm støð, har neyðugar fyrireikingar skulu gerast fyri at kunnu byggja út við vindorku. Talan er um hagar við Eiðisvatn, á Glyvrafjalli, á Sandoynni, á Kirkjubøreyni og Junkarahaga í Kvívík. Vindmátimastur er sett upp við Eiðisvatn, og nýggjar mastrar verða reistar á hinum støðunum í góðari tíð.

Nýggjar tekniskar treytir fyri íbinding í elkervið, bæði hvat framleiðslueindum og kundum viðvíkur, eru staðfestar. Nú ber til hjá smáum sól-, vind- og vatnorkuverkum, ið eru minni enn 11 kW, at framleiða inn á elkervið sambært lagaligum tekniskum treytum og fyri fastar prísir. Framleiðslueindir størri enn 11 kW hava somu treytir fyri íbinding, sum SEV setir egnum verkum felagsins, og har skal fyri hvørt einstakt verk fyriliggja prísavtala millum eigaran og SEV, sum skal góðkennast av Orku.

P/f Føroysk Náttúruorka, sum er nýtt dótturfelag hjá P/F Bakkafrost, hevur gjørt samstarvssáttmála við SEV sambært íbindingartreytunum. Felagið fer at byggja biogassverk á Skarðshjalla, har ein motorur á verkinum skal framleiða el, sum SEV keypir.

## Gransking og vitan

SEV er nú partur í nýggju skipanini hjá Granskingarráðnum, har stuðul verður latin til vinnu-ph.d. lesandi. Ein trý ára avtala er gjørd við ein orkuverkfrøðing um ph.d. lestur í samstarvi millum SEV, Fróðskaparsetrið og Aalborg Universitet. Heitið á verkætlanini er "Trygdarveiting fyri einum støðugum elneti og eini álítandi elveiting í eini 100% burðardyggari elskipan í Føroyum". Føroyar ganga á odda á elorkuøkinum, og vit eru tí í stóran mun noydd til sjálv at standa fyri granskingini av møguleikum hjá avbyrgdum oyggjasamfeløgum. Á nógvum økjum hava vit ikki møguleika at brúka gransking uttanlands, tí hon finst rætt og slætt ikki. Hetta merkir, at onnur lond, serliga oyggjasamfeløg, hava áhuga fyri gransking av hesum slagi, sum verður gjørd í Føroyum.

Samstarvsavtala er gjørd millum SEV og svenska felagið Minesto, sum eru frammarlaga í menningini av havorkutøkni, um royndir við tveimum 100 kW sjóvarfalseindum, sum áhaldandi vera mentar. Royndirnar byrja í ár og fara ætlandi fram í Vestmannasundi næstu árini. Hetta er ein spennandi verkætlan við einari nakað øðrvísi tøkni, enn vit vanliga hava sæð. Talan er um ein dreka, ið er festur í eitt søkk á botni, og sum sveimar runt í sjónum í einum 8-tali. Á drekanum situr ein turbina við einari skrúvu, sum í ferðini melur og framleiðir el. Á heimasíðuni hjá SEV sæst, hvussu drekin virkar.

SEV hevur í samstarvinum bundið seg til at keypa elorkuna, sum Minesto framleiðir við sjóvarfalsturbinunum á royndarstigi í nøkur ár. SEV hevur harumframt bundið seg til at veita neyðuga undirstøðukervið – eitt nú netsamband og neyðug loyvi. Fyrireikingin av verkætlanini, sum fer fram í samstarvi við fleiri føroyskar fyritøkur, er í gongd.

Í juni 2018 luttóku nevnd og leiðsla á árligu ráðstevnuni hjá Eurelectric, sum var í Ljubljana í Slovenia. Eitt stórt evni á ráðstevnuni var, hvussu orkuframleiðslan skal leggjast um til grønt el (spor 1), og hvussu brúkararnir fáast at leggja um til elloysnir (spor 2). Vit fingu heilt klárt ta fatan, at vit eru á rættari leið í Føroyum, og at vit í orkuskiftinum eru frammarlaga sammett við londini í Evropa. Á ferðini vitjaðu vit eisini eitt verk í Sveis við pumpu- og turbinuskipan.

## Aðrar útbyggingar

Arbeiðið at byggja eina nýggja Støð 3 á Sundsverkinum við 37 MW motormátti er í gongd, og tað gongur væl. Útbyggingin hevur við sær, at Sundsverkið verður uppstigað til at hava ein motormátt svarandi til nakað meira enn verandi tørvin á elorku, tá ið hann er hægstur (spísslastin). Verkið verður ætlandi yvirtikið við ársbyrjan 2020, og samlaði kostnaðurin er mettur til nakað oman fyri 700 milliónir krónur. Tá er ein nýggj koplingarstøð fyri umleið 60 milliónir krónur íroknað.

Nýggja dagtangahúsið á Sundsverkinum var sett í rakstur í november 2018. Tilsamans hava nýggi tangagarðurin og dagtangahúsið kostað 143,4 milliónir krónur. Tað er seks milliónir krónur hægri enn ætlað. SEV metir seg hava fingið væl burtur úr verkætlanini.

Vaksandi eftirspurningurin eftir elmegi, sum serliga kemur frá alingini og uppsjóvarvinnuni, hevur eisini við sær munandi útbyggingar á netinum. Nýggju koplingarstøðirnar í Runavík, innan Eið nærhendis Kambsdali og norðuri á Strond í Klaksvík eru sjónlig dømi um hetta. Saman við útbyggingunum fer eisini umfatandi kaðallegging fram. Stóru útbyggingarnar

innan alivinnuna stava m.a. frá, at smolt verða ald longur á landi, áðrenn tey verða latin á sjógv. Umleggingin heldur fram nøkur ár aftrat. Farið er eisini undir nýggja koplingarstøð í Vestmanna, nú verandi støð er vorðin gomul og skal skifast út.

Samanumtikið kann sigast um netið, sum er partur av kjarnuveitingunum, at síðani SEV miðvíst fór at kaðalleggja alt elnetið eftir jólaódnina í 1988, eru brekini á netinum minkað munandi ár um ár. Í 1989 vóru 197 brek staðfest á háspenninginum, og sløk 30 ár seinni í 2018 vóru brekini á háspenninginum 12 í tali. Sostatt er talið av brekum minkað 94 prosent eftir 30 árum, tó at gongdin ikki altíð hevur verið javnt lækkandi. Havast skal í huga, at øll brek ikki eru tað sama sum umfatandi streymslit, men hvørja ferð brek er á háspenninginum, verða ein ella fleiri kundar órógvaðir.

Nevndin fegnast um hesa góðu gongdina innan netvirksemið. Vit kunnu takka virkisfýsnum undangongufólkum og samhaldsføstu elskipanini fyri, at vit í dag eiga eitt so gott og trygt elnet í Føroyum, sum eisini skal vera grundarlagið undir tryggari, bíligari og grønari elorku komandi árini, tá ið tað tvífalda av verandi orkunýtslu skal flytast ígjøgnum netið.

## Annað nevndararbeiði

Spurningarnir frá Sands kommunu viðvíkjandi luttøku hjá varalimum í nevndini o.ø. eru svaraðir, og tillagingar eru gjørdar í starvsskipanini fyri nevndina. Frágreiðing um málið er latin eigarum felagsins. Somuleiðis verður í løtuni arbeitt við at gera eitt upprit, sum greiðir frá viðurskiftunum kring nevndarval í SEV.

Á aðalfundinum á heysti 2016 var spurningurin um nevndarsamsýning hjá SEV umrøddur. Nevndin arbeiðir við hesum máli, og ætlandi skuldi verið komið á mál til eykaaðalfundin í november 2018. Landsumsitingin, ið er góðkennandi myndugleiki hesum viðvíkjandi, arbeiðir við somu spurningum í løtuni, og tí var mett hóskandi at bíða eftir niðurstøðuni og soleiðis fáa høvið at hava teirra arbeiðið í huga, tá nevndin heldur fram at viðgera hetta málið. Á eykaaðalfundinum í november 2018 var samtykt, at verandi leistur fyri nevndarsamsýning eisini verður galdandi í 2019.

Landsstreymsskipanir hava verið umrøddar á fleiri aðalfundum hjá felagnum, og tí hevur nevndin viðgjørt henda spurningin nærri. Støðan er, at munandi íløgur skulu gerast við atløgubryggjur og umborð á skipunum. Í tann mun at skipini og havnaløgini gera hesar íløgurnar og biðja um elveiting, vil SEV veita streym á vanligan hátt. Verður talan um at skipa hetta á annan hátt, luttekur SEV gleðiliga í tí samskiftinum eisini.

## Roknskaparúrslit fyri 2018

Úrslit hjá SEV fyri 2018 er 38,1 milliónir krónur eftir skatt. Hetta er ikki eitt nøktandi úrslit sammett við virksemið hjá felagnum. Tað er neyðugt við betri úrslitum, nú stórar íløgur við tilhoyrandi eginfígging standa fyri framman.

Oljan er framhaldandi ein stór útreiðsla hjá SEV, og samlaða nýtslan var á 105,8 milliónir krónur í 2018. Hetta er ein øking á 21,1 millónir krónur sammett við 2017, og talan er um eina samlaða øking á 54,9 milliónir krónur sammett við 2016. Útreiðslan til oljuna er ein stór orsøk til trýstið á elprísin, sum føroyingar hava merkt og enn merkja.

## Fíggjarætlanin fyri 2019

Fíggjarætlanin fyri inniverandi ár hevði við sær eina príshækking á 10 oyru/kWt uttan MVG 1. januar 2019, og hon gevur eitt ætlað yvirskot á 81,3 milliónir krónur fyri skatt – 66,6 milliónir krónur eftir skatt. Komandi úrslitini hjá felagnum eiga í minsta lagi at liggja á hesum støði, nú stórar útbyggingar til gagns fyri veitingartrygdini, veitingarskylduni og grønu kósini eru á skránni, samstundis sum munandi eginfígging skal útvegast.

Víst verður eisini til frágreiðing frá SEV nevnd "FÍGGJARGONGDIN 2018 og RAKSTRAR-, FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN 2019", sum er tøk á heimasíðu felagsins.

## Virkishugur og nýhugsan

Stórur áhugi er at vera við í grønu útbyggingunum serstakliga í meginøkinum. Nevnd og leiðsla eru errin av eina ferð enn at staðfesta, at hetta seinasta árið eru aftur tikin ítøkilig stig á grønu kósini. Her verður m.a. hugsað

- um, at SEV aftaná vindútboð hevur fingið loyvi til at seta vindmyllur upp oman fyri Porkeri
- um kanningina, "Energilagring på Færøerne, 2018", ið SEV greiddi úr hondum saman við Orku og Dansk Energi, og sum var handað landsstýriskvinnuni í orkumálum í august
- um kanningina hjá Dansk Energi av møguligari sundurskiljing av neti og framleiðslu.

# Frágreiðing frá nevndini

Kanningarnar geva holla vitan, sum er gott grundarlag undir langtíðar virkisætlanini. Samsvarandi virkisætlanini verður vindorkan sambært verandi útboðum økt úr 18 MW upp í 60 MW næstu tvey árini.

Menning og framtakshugur skulu framhaldandi eyðkenna virksemið hjá elfelagnum soleiðis, at ein dagligur virkishugur við nýhugsan og fimum hugsanarhátti er ein sjálvsagdur partur av arbeiðinum.

Okkara góða samskifti við landsmyndugleikarnar er við til at tryggja, at vit hava fótafestið í okkara samstarvi, sjálvt um snávingarsteinar eru á vegnum. Elfelagið er sinnað at samstarva við øll tey, sum vilja ganga grønu kósina á ein tøkniliga, umhvørvisliga og búskaparliga skynsaman hátt. Avgerandi fyri at náa á mál er eisini, at brúkarin sær týdningin av at ogna sær grønu orkuloysnirnar fyri at varðveita okkara einastu jørð til komandi ættarlið.

Sjálvt um ein visión kann tykjast fjar, so fekk SEV náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins í 2015 fyri visión 2030. Visiónin er vorðin til eitt ítøkiligt mál, við at restin av samfelagnum hevur tikið grønu kósina til sín.

Aðalmálið hjá SEV er at veita trygga, bíliga og grøna elorku, og á hesum grundarlagi tænir okkara samhaldsfasta elfelag øllum samfelagnum – húskjum, stovnum og eisini vinnulívinum. Skulu vit framhaldandi halda fast um hetta aðalmálið, krevst undirtøka frá kommununum og borgarstjórunum. Vegna nevndina heiti eg á allar kommunupolitikarar um at verja hesi áhugamál, so nýggja samfelagið, sum verður grundað á varandi orkukeldur, framhaldandi fær sum mest burtur úr orkutilfeinginum. Eitt virðismikið tilfeingi, sum longu er, og í nógv størri mun fer at verða gagnnýtt til at framleiða elmegi.



Vit standa á gáttini til eina broytta samanseting av orku til føroyska samfelagið. Í stóran mun eru tað okkara val, sum gera av, hvussu trygg, bílig og grøn elorkan til broytta samfelagið verður.

**John Zachariassen,**
**nevndarformaður**

mars 2019

# Bygnaður


Aðalfundur
Nevnd
Stjóri
Samskifti
Menning
Stjórnarskrivari
HTU-leiðari
Deildarstjóri net
Deildarstjóri fyrisiting
Deildarstjóri framleiðsla
Teknistovan
Vaktin, lastfordeiling
Rakstur
Innleggingar
Elverkfrøði og rakstur koplingarstøðir
Eltøkni
Framleiðslan
Sundsverkið
Vágsverkið
Eiðisverkið
Verkini í Vestmanna
Strond og smáverkini
Kundatænasta
Roknskapur
Fyrisitingartoymi
Starvsfólkadeild
KT
Kontrollari

# Vegurin slóðaður fyri grønum framburði

## Nýggjastu kanningarnar av elorkuøkinum stuðla væl upp undir varðagøtuna, sum er løgd á grønu kósini. Nú krevst bara, at allir partar lyfta í felag fyri at røkka málinum um 100 prosent grøna elorku á landi í 2030

– Varðagøtan er løgd fram ímóti grøna málinum í 2030, sum SEV setti sær í 2014, og síðan hava fleiri og fleiri tikið undir við hesi visión. Varðagøtan er væl stuðlað av tveimum feskum kanningum av ávikavist orkugoymslum og møguleikanum at skilja net og elframleiðslu sundur. Nú er bara at fáa ferð á grønar útbyggingar, og við góðum samstarvi røkka vit málinum.Orðini eigur John Zachariassen, nevndarformaður í SEV, sum er sannførdur um, at málið um 100 prosent grøna elorku á landi í Føroyum í 2030 verður rokkið, um allir partar lyfta í felag og leggja til brots nú.

– Yvirskipaða arbeiðsætlanin er klár, og nýggjastu kanningarnar vísa, at vit skulu byggja lutfalsliga nógv út við sólorku og vindorku næstu árini, umframt at SEV eigur at vera kjarnin í elskipanini. Og útbjóðing í fríari kapping kann fara fram í framleiðslupartinum, tá talan er um vindorku, sólorku, sjóvarfall og biogass, staðfestir John Zachariassen, nevndarformaður.

**“Nú er bara at fáa ferð á grønar útbyggingar, og við góðum samstarvi røkka vit málinum.”**

Seinasta útboðið í Porkerishaganum staðfestir, at SEV ger serstakliga kappingarfør tilboð, og tí leggur nevndin dent á týdningin av, at SEV framhaldandi bjóðar seg fram til komandi kappingar um at framleiða el úr vindorku.

– Spennandi verður at fylgja við slóðbrótandi verkætlanunum, sum skjøtil varð settur á í 2018, har el skal framleiðast úr biogassi og sjóvarfalsorku, sigur John Zachariassen, nevndarformaður.

Hann vísir harumframt á, at SEV fyri sín part hevur fingið lagaliga fígging til vega at taka tey næstu stigini á grønu kósini til gagns fyri føroyska samfelagið – og ikki minst vinnuna. Haraftrat er eitt gott grundarlag lagt seinnu árini fyri framhaldandi grønum útbyggingum.

– Fýra ár eru farin, síðani vit settu seinastu vindmyllurnar upp í Húsahaga, sum hava eina battarískipan knýtta at sær, ið javnar elframleiðsluna úr vindi út á netið. Við battaríunum gagnnýta vit størri part av óstøðugu vindorkuni, greiðir John Zachariassen frá.

Hann sigur, at hesi fýra árini eru nógvar virðismiklar royndir og áhugaverd kanningarúrslit fingin til vega at byggja víðari á. Tað er kortini ein fortreyt, at kjarnuveitingarnar í elskipanini liggja trygt í einari samlaðari eind, har vatnorkan og oljuverkini eru sjálvur bulurin í elskipanin tey fyrstu árini. Men so hvørt fleiri grønar orkukeldur verða bygdar inn í skipanina, verða vatnorkan og pumpuskipan bulurin í skipanini, og tá verður oljan tiltakstrygd, tí Føroyar hava einki kaðalsamband við umheimin.

– Grønu útbyggingarnar eru góðar fyri umhvørvið, og tær kunnu smitta av sær á aðrar vinnugreinar sum t.d. fiskivinnuna, laksavinnuna og ferðavinnuna, ið harvið kunnu selja sínar vørur og tænastur úr einum reinum og grønum umhvørvi. Harumframt eru útbyggingar við grønum orkukeldum eisini bíligari, tí tær eru ikki so rakstrartungar sum oljuriknu verkini, og sostatt hava vit sum samfelag alt at vinna, sigur John Zachariassen.

Niðurstøðan hjá nevndarformanninum í SEV er, at vegurin er slóðaður fyri grønum framburði næstu 15 árini, men at tað krevst ein breið politisk semja um, hvussu elskipanin skal setast saman, soleiðis at hon verður so trygg, bílig og grøn og sostatt so samfelagsgagnlig sum gjørligt.

– Tað verður lættari at arbeiða og røkka málinum, um allir partar kenna og virða spælireglurnar frameftir, sigur John Zachariassen, nevndarformaður í SEV.



# Orkukanning mælir til sól og vind

## Ein orkukanning, sum Umhvørvisstovan greiddi úr hondum vegna Heilsu- og innlendismálaráðið, mælir í fyrstu atløgu til at útbyggja vindorkuna og sólorkuna, og um nøkur ár er m.a. skilagott at byggja pumpuskipan í Vestmanna

Orkukanningin, sum Umhvørvisstovan læt landsstýriskvinnuni í orkumálum, Sirið Stenberg, í august 2018, er gott undirstøði at byggja á, tá næstu stigini skulu takast fram ímóti 100 prosent varandi orku á landi í Føroyum í 2030.

Niðurstøðan er í stuttum, at vindorka og sólorka eiga at byggjast út næstu árini, og um nøkur ár er m.a. skilagott at byggja pumpuskipan í Vestmannaøkinum. Útbyggingarnar við vindmyllum, battaríiskipan og pumpuskipan í Suðuroynni, sum longu eru settar á breddan, verða eisini umrøddar í kanningini sum skilagóð stig at taka beinanvegin.

Íløgurnar eru settar til 400 milliónir krónur um árið frá 2016 at rokna – vaksandi til 650-700 milliónir krónur um árið í 2030. Úrslitini vísa eisini, at orkuprísurin frá 2016 fram ímóti 2020 hækkar eitt sindur, men longu í 2024 lækkar orkuprísurin aftur niður um orkuprísin í 2016, og prísurin heldur fram at lækka spakuliga fram ímóti 2030.

### Kanningararbeiðið

Kanningin tekur støði í tøkniligu møguleikunum, og hvussu tað búskaparliga best loysir seg at byggja út føroysku orkuskipanina. Kanningin nevnist "Energilagring på Færøerne 2018", og hon er gjørd í samstarvi millum Orku á Umhvørvisstovuni, SEV og Dansk Energi, umframt at ráðgevandi fyritøkurnar Ea Energy Analyses og Norconsult hava gjørt simuleringar og greiningar í fleiri umførum.

Í greiningunum er arbeitt við varandi orkukeldum, orkugoymslum, støðufestinum í elskipanini, búskaparligum útrokningum, tøkniligum avbjóðingum og elorkutørvinum – íroknað orkuskiftið frá olju til varandi orku innan ferðslu, flutning og upphiting næstu árini. Øll hesi viðurskifti skulu verða í einum samspæli á vegnum fram ímóti málinum at gera Føroyar 100 prosent grønar á landi í 2030, og tí var tørvur á einari neyvari kanning at grunda næstu ítøkiligu stigini á grønu kósini á.

Kanningin býtir tíðarskeiðið fram til 2030 í tvey. Fyrstu fimm árini, og tíðina eftir hetta fyrsta fimm ára skeiðið á grønu kósini.

### Fyrra skeiðið

Fyrstu fimm árini skal dentur leggjast á ein størri part av varandi elframleiðslu. Talan er t.d. um framkomnar vindmyllur, sum eins og í Húsahaga eru knýttar at battaríiskipanum, ið javna óstøðugu vindorkuna út á elnetið eftir sekundum ella minuttum. Eisini er neyðugt at byggja sólorkuskipanir at lofta summarmánaðunum, tá ofta er lítið av vatni og vindi.

Harumframt eiga neyðugu útbyggingarnar av netinum eisini at verða framdar fyrstu fimm árini, soleiðis at lagt verður upp fyri økta og broytta máttinum, sum m.a. kemur við orkuskiftinum frá olju til alsamt meira varandi orku. Í hesum fyrra skeiðnum eru vindmyllulundirnar, sum longu eru í ávikavist útboði og viðger á Eiði og í Porkeri, tiknar við í útrokningarnar, umframt at pumpuskipanin í Suðuroy eisini er partur av hesum skeiðnum.

### Seinna skeiðið

Tíðina eftir fyrstu fimm árini skal dentur framhaldandi leggjast á at útbyggja varandi orkuna, og mett verður, at ein miðal útbyggingarferð av bæði vindorku og sólorku liggur millum 20 MW og 30 MW annaðhvørt ár í hesum tíðarskeiðnum. Tá skal eisini stigvís útbygging av orkugoymslum í pumpuskipanum fara fram, soleiðis at varandi orkuframleiðslan verður gagngnýtt í mest møguligan mun.



Fyrsta stigið at byggja pumpuskipan í Vestmannaøkinum kann takast uttan at víðka byrgingarnar, og hetta kann hóskandi fara fram á leið 2024-25. Ein útbygging av byrgingunum verður helst ikki neyðug, fyrr enn vit nærkast 2030. Tað verður eisini mett, at eftir 2025 verður ein kaðal til Suðuroyar helst ein fyrimunur fyri samlaðu skipanina.

Í kanningini verður víst á, at neyðugt er áhaldandi at fylgja væl við, hvussu nýggjar innovativar loysnir verða mentar innan varandi orku, og tí kann gerast neyðugt at tillaga langtíðarætlanina, so hvørt nýggir tøkniligir og burðardyggir møguleikar koma undan kavi.

Battarí at goyma orku í langa tíð kunnu eisini gerast framtíðar orkugoymslur, men enn eru battarí sum langtíðargoymslur ikki búskaparliga áhugaverd, verður sagt í kanningini av orkugoymlsum í Føroyum.

Sjóvarfalsorkan er ov lítið ment enn, og tí loysir tað seg ikki búskaparliga at dúva upp á hesa varandi orkukelduna í løtuni. Kortini er týdningarmikið at fylgja við sjóvarfalstøknini, og tað er júst tað, SEV ger í avtaluni við svensku fyritøkuna Minesto, sum skal gera royndir við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi við sonevndum undirsjóvardrekum.





# Rúm fyri bæði almennum og privatum í føroysku elskipanini

**Ein kanning av møguleikanum at skilja sundur elnetið og elframleiðsluna, sum Dansk Energi hevur gjørt, mælir m.a. til, at nýggj elframleiðsla verður boðin út í kapping, har onnur áhugað enn SEV kunnu fáa fyrimun, men at SEV framhaldandi hevur leiklutin at tryggja støðufestið í elskipanini**



# Rúm fyri bæði almennum og privatum í føroysku elskipanini

Bæði SEV og privatir framleiðarar kunnu hava sín týðandi leiklut í framtíðar elskipanini í Føroyum. Soleiðis ber í stuttum til at taka samanum tilmælini í eini kanning, sum serfrøðingar hjá Dansk Energi hava gjørt av møguleikunum at skilja elframleiðsluna og elnetið í Føroyum sundur.

Í kanningini verður víst á, at nýggj elframleiðsla innan t.d. vind, sól og sjóvarfall verður boðin út í kapping, har orkumyndugleikin velur lægsta tilboðið samsvarandi útbjóðingartreytunum. Orkumyndugleikin skal tó kunna velja SEV frá í útboðnum, um myndugleikin metir, at kappingin hevur verið nøktandi millum hinar partarnar, sum bjóða.

## Kjarnuveitingarnar liggja best hjá SEV

Tá talan er um kjarnuveitingar (systemydelser), sum er tann parturin av elskipanini, ið áhaldandi tryggjar støðufestið og veitingartrygdina í elskipanini, vísa serfrøðingarnir á, at tað er skilabest, at SEV umsitur hendan partin.

Kjarnuveitingarnar snúgva seg í stuttum um, at oljuverkini, stóru vatngoymslurnar og vatnorkuverkini hjá SEV alla tíðina halda elskipanini í eini nøktandi javnvág, sum einhvørja tíð kann hava bæði minni og størri leiklut í elframleiðsluni, alt eftir hvussu tað gongst at fáa elorku til høldar frá t.d. vindmyllum, sólskipanum og sjóvarfalli. Ein framtíðar pumpuskipan og elnetið eru eisini partar av kjarnuveitingunum í einum avbyrgdum oyggjasamfelag, sum ikki kann keypa elorku ígjøgnum kaðalsamband við grannalondini.

SEV eigur longu stóru vatngoymslurnar og oljuriknu verkini, og tað er høvuðsorsøkin til, at serfrøðingarnir hjá Dansk Energi mæla til, at SEV hevur kjarnuveitingarnar um hendi. Kjarnuveitingarnar eru beinleiðis tongdar at møguleikanum at goyma orku sum t.d. í stórum vatnbyrgingum og í oljutangum, har oljan tó so líðandi skal niðurlagast í elframleiðsluni, so hvørt fleiri grønar orkukeldur verða bygdar inn í elskipanina. Tá elframleiðslan verður 100 prosent grøn, verða tað fyrst og fremst vatngoymslur, pumpuskipanir og møguliga battarískipanir, sum skulu tryggja støðufestið í elskipanini, meðan oljan verður tiltakstrygd.

## Týðandi at sammeta við onnur oyggjasamfeløg

Í kanningini verður mælt til, at elnetið framhaldandi verður skipað eftir einum "hvíl í sær sjálvum" leisti, og at netparturin verður "benchmarkaður" upp ímóti øðrum elnetum sum t.d. elnetinum á Bornholm, ið líkist tí føroyska, ella elnetinum í Íslandi. Mælt verður eisini til at "benchmarka" onnur einstøk virkisøki fyri seg.



**"Tá talan er um kjarnuveitingar, vísa serfrøðingarnir á, at tað er skilabest, at SEV umsitur hendan partin."**




*Jørgen S. Christensen, stjóri fyri gransking og tøknifrøði hjá Dansk Energi, legði kanningina um møguliga sundurskiljing av elnetinum og elframleiðsluni fram á Hotel Hafnia. Dansk Energi gjørdi kanningina eftir áheitan frá SEV.*

Serfrøðingarnir mæla eisini til at seta í verk eitt arbeiði, sum hevur til endamáls at greina út og staðfesta leiklutin hjá SEV í einari framtíðar skipan, har elorka skal keypast inn frá fleiri ymiskum elframleiðarum. Eisini verður skotið upp at gjøgnumganga verandi arbeiðsgongdir hjá SEV við tí fyri eyga at kanna, um SEV kann gera sítt arbeiði effektivari. Hetta eigur at gerast av óheftum serfrøðingum.

Harumframt verður í kanningini víst á, at um tað gongur ov seint at fáa gongd á grøna upphiting og grøna orku til flutning, so kunnu myndugleikarnir, um tað er neyðugt, umhugsa at áleggja SEV at fara inn í hesar uppgávur í einum avmarkaðum tíðarskeiði.

Dansk Energi hevur gjørt kanningina eftir áheitan frá SEV, ið framanundan hevði kunnað orkumyndugleikan um arbeiðssetningin, og sum eisini hevur lagt niðurstøðuna fram fyri myndugleikarnar.

# Grøna elorkan sløk 49 prosent í 2018

## Tilsamans 48,8 prosent av elorkuframleiðsluni í 2018 stavaðu frá vatni og vindi. Hetta er ein lítil afturgongd sammett við undanfarnu tvey árini, tá meira enn helvtin av elframleiðsluni var grøn

Grøna elorkan var 48,8 prosent av samlaðu elframleiðsluni í 2018, og sostatt stavaðu 51,2 prosent frá oljuriknu verkunum. Vatnorkan stóð fyri 30,7 prosentum av elframleiðsluni í fjør, og tað er 2,6 prosentstig lægri sammett við 2017. Hinvegin var vindorkuframleiðslan tann hægsta nakrantíð í 2018, tá 18,1 prosent av elframleiðsluni komu frá vindorkuni. Í 2017 var lutfallið millum vatn- og vindorku ávikavist 33,3 og 17,8 prosent.

Vindmyllulundin í Húsahaga framleiddi 40 GWt í 2018, og tað er higartil mesta vindorkuframleiðsla í Húsahaga.

Orsøkin til niðurgongdina í vatnorkuframleiðsluni er bæði minni avfall í 2018 og frostbindingar fyrsta partin av árinum. Fyrstu fýra mánaðirnar í fjør regnaði minni, samstundis sum kuldi elvdi til frostbindingar í fleiri vikur, og sostatt rann einki vatn í byrgingarnar, tí regnið frysti í lendinum. Harumframt var serstakliga turt veður í seinnu helvt av mai og fyrru helvt av juni.

Nógv virksemi er í samfelagnum, og tí er áhaldandi stórur vøkstur í eftirspurninginum eftir elorku. Elframleiðslan øktist 5,3 prosent í 2018, tá SEV framleiddi 352 GWt, sum er tað mesta nakrantíð. Vøksturin í elframleiðsluni var tann sami í 2017, tá elframleiðslan var 334 GWt.

**"Vindorkuframleiðslan í 2018 var tann hægsta nakrantíð."**

Framleiðslan **yvir**

**80%**

Vatn: maks **89,14%**

**GRØN**

Vindur: maks **77,55%**

**32,5 dagar**

**100%**

Vatn: maks **89,14%**

**GRØN**

Vindur: maks **77,55%**

**13 dagar**

Framleiðslan **yvir**

**80%**

Vatn: maks **93,8%**

**GRØN**

**21 dagar**

**100%**

**GRØN**

**0 dagar**



# Óvanliga stórur vøkstur í elnýtsluni

## Í framleiddum GWt var talan um eitt gott grønt ár hjá SEV í 2018, men óvanliga stóri eftirspurningurin eftir elorku í 2017 og 2018 hevur havt við sær, at sammett við samlaðu elframleiðsluna, hevur talan verið um lutfalsliga afturgongd í prosentum

Um hugt verður at grønu elframleiðsluni í prosentum seinastu fýra árini, so skarar 2015 framúr við 60 prosentum elorku úr vatni og vindi, og síðani er í prosentum staðfest ein afturgongd í grønari elorku á umleið 10 prosentstig, tó at árliga grøna framleiðslan í prosentum hevur ligið á einum jøvnum støði síðani 2015 – 50 prosent í 2016, 51 prosent í 2017 og 49 prosent í 2018.

Um hugt verður at framleiðlsuni í GWt, so sær myndin øðrvísi út, tí tá er 2018 besta grøna árið síðani 2015.

**172 GWt** grøn elorka í 2018
av tilsamans 352 GWt

**171 GWt** grøn elorka í 2017
av tilsamans 334 GWt

**158 GWt** grøn elorka í 2016
av tilsamans 317 GWt

**189 GWt** grøn elorka í 2015
av tilsamans 314 GWt

Høvuðsorsøkirnar til fallið frá 60 prosentum niður á 50 prosent eru m.a. góðveður í 2016 og óvanliga stórur vøkstur á góð fimm prosent í elnýtsluni í 2017 og 2018. Henda gongdin tykist at halda fram, tí fyrsta ársfjórðing í 2019 hevur vøksturin í elnýstluni verið umleið 10 prosent sammett við sama tíðarskeið í 2018.

### 2016, 2017 og 2018

Góðveður í 2016 var høvuðsorsøkin til stóru afturgongdina í grønari elframleiðlsu sammett við 2015, sum var eitt metár fyri vatnorkuframleiðsluna við sera nógvum avfalli. 2016 var hinvegin eitt óvanliga turt ár.

2017 var fyrsta árið, battarískipanin í Húsahaga var partur av elskipanini eitt heilt rakstrarár. 94 prosent av vindinum í Húsahaga vóru fingin til høldar í 2017. Tað var ein vøkstur í gagnnýtsluni av vindinum upp á 16 prosentstig sammett við 2016, tá ið battarískipanin í Húsahaga bert var í rakstri seinastu fýra mánaðirnar av árinum. Samstundis øktist eftirspurningurin eftir elorku 5,3 prosent sammett við 2016, tá ið elframleiðslan tilsamans var 317 GWt. Í 2017 var elframleiðslan tilsamans 334 GWt.

Vøksturin helt fram í 2018, tá elframleiðslan aftur øktist 5,3 prosent sammett við árið fyri. Samlaða elframleiðslan í 2018 var uppi á 352 GWt. Samstundis framleiddi vindmyllulundin í Húshaga 40 GWt, sum er mesta vindorkuframleiðsla í Húsahaga higartil. Minni avfall, frostbindingar og serstakliga turt veður í seinnu helvt av mai og fyrru helvt av juni høvdu tó við sær, at vatnorkuparturin gjørdist eitt vet minni enn í 2017.

**“Gongdin tykist at halda fram, tí fyrsta ársfjórðing í 2019 var vøksturin í elnýstluni umleið 10 prosent hægri enn sama tíðarskeið í 2018.”**

# Royndir við sjóvarfalsturbinum í Vestmannasundi

**SEV og svenska felagið Minesto fara undir royndir við nýggjari sjóvarfalstøkni í Vestmannasundi um ársskiftið 2019-2020. Í fyrstu atløgu verður talan um tvær sjóvarfalsturbinur í Vestmannasundi**

Ein samstarvsavtala millum SEV og svenska felagið Minesto, sum er millum fremstu mennarar av havorkutøkni, hevur við sær, at ein royndarverkætlan við sjóvarfalli fer í gongd í Vestmannasundi um ársskiftið 2019-2020.

Samstarvið umfatar uppseting, verkseting og rakstur av tveimum eindum av Minesto DG 100 modellum, sum eru partar av Deep Green, ið er serstøk tøkni við undirsjóvardrekum. Henda tøknin er nakað øðrvísi tøkni, enn vit vanliga hava sæð innan sjóvarfalsorku. Talan er um ein dreka, ið er festur í eitt søkk á botni, og sum sveimar runt í sjónum í einum 8-tali. Á drekanum situr ein turbina við einari skrúvu, sum í ferðini melur og framleiðir elorku.



*Minesto DG 100 sjóvarfalsturbinurnar, sum ætlanin er at festa í botnin í Vestmannasundi, ferðast í einum 8-tali í sjónum, meðan tær framleiða elorku.*

# Royndir við sjóvarfals-turbinum í Vestmannasundi

SEV hevur í samstarvinum bundið seg til at keypa elorkuna, sum Minesto framleiðir við sjóvarfalsturbinunum á royndarstigi í nøkur ár. SEV hevur harumframt bundið seg til at veita neyðuga undirstøðukervið – eitt nú netsamband, og neyðug loyvi. Fyrireikingin av royndarøkinum í Vestmannasundi er byrjað.

– Vit eru sera fegin um hesa avtaluna við SEV, sum er ein framkomin samstarvsfelagi við slóðbrótandi ætlan um orkuskifti og við sjóvarfalsorku í heimsflokki. Við tøknini hjá Minesto fer at bera til at framleiða bíliga, burðardygga orku, sum kann gerast ein týðandi partur í skiftinum hjá Føroyum til 100 prosent grøna elorku á landi í 2030, sigur Dr. Martin Edlund, forstjóri í Minesto.

Samstarvið er fyrsta stigið í eini yvirskipaðari ætlan at fáa størri nøgdir av sjóvarfalsorku inn í føroysku elframleiðsluna. Um SEV í royndartíðini staðfestir, at Green Deep tøknin er haldfør og búskaparliga áhugaverd sammett við aðra tøkni, so verða Green Deep turbinurnar møguliga fastur partur av grønu, føroysku elframleiðsluni. Miðað verður eftir umleið 30-70 MW framleiðslumátti í sjóvarfalsturbinum, men tað er ein treyt, at tøknin er ment so mikið, at tað loysir seg búskaparliga.







**“Vit eru sera fegin um hesa avtaluna við SEV, sum er ein framkomin samstarvsfelagi við slóðbrótandi ætlan um orkuskifti og við sjóvarfalsorku í heimsflokki.”**

# Royndir við sjóvarfals-
# turbinum í Vestmannasundi



Føroyar hava sum avbyrgt oyggjasamfelag ikki møguleika at keypa elorku frá grannalondunum, og tí skal SEV áhaldandi skipa sín egna tiltaksmátt.

– Vit hava fyri neyðini sjálv at skapa møguleikarnar fyri eini burðardyggari framtíð, og í SEV arbeiða vit tí støðugt við at tillaga koyriætlanina fyri at røkka málinum um 100 prosent burðardygga elorku á landi í 2030, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

SEV hevur saman við ráðgevarafelagnum Sp/f Rák arbeitt í eitt ár við at kanna rákviðurskiftini í Føroyum, tí sjóvarfalsorka kann fáa stóran týdning, um tað loysir seg búskaparliga.

– Sjóvarfalsorka á einum rímiligum kostnaðarstøði kann gerast ein týðandi partur av elframleiðsluni. Vit eru spent at kanna hesar møguleikar nærri saman við Minesto og teirra slóðbrótandi tøkni, sum framleiðir elorku úr sjóvarfallinum", sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.





**“Vit hava fyri neyðini sjálv at skapa møguleikarnar fyri eini burðardyggari framtíð, og í SEV arbeiða vit tí støðugt við at tillaga koyriætlanina fyri at røkka málinum um 100 prosent burðardygga elorku á landi í 2030.”**



Fyrsta Deep Green 100 turbinan verður væntandi fest í havbotnin í Vestmannasundi seint í 2019 ella tíðliga í 2020, og seinna turbinan verður sett upp beinanvegin í framhaldi av fyrru turbinuni. Royndarverkætlanin er fíggjað lutvíst av Minesto og SEV, og harumframt er fígging fingin til vega úr almennum grunnum.

Minesto hevur sum mál at menna havorkutøkni, ið kann minka um umhvørvisávirkanina frá orkuídnaðinum um allan heim. Fyritøkan sær góðar møguleikar at vinna orku úr havinum, og Minesto hevur patent upp á Deep Green tøknina, sum fyritøkan hevur vunnið virðislønir fyri.



# Sólorka í Sumba

**SEV fer undir eina royndarverkætlan við sólorku í Sumba. Ein sólorkuskipan verður væntandi sett upp á gamla fótbóltsvøllinum í bygdini summarið 2019. Sólorka er gott ískoyti til varandi orku í Føroyum sertakliga tíðarskeiðið mai til august, tá tað ofta er lítið av vatni og vindi**

Hóast Føroyar ikki eru eitt land við ovurstórari nøgd av sóltímum, so er viðkomandi at hava sólorku sum ein part av varandi orkukeldunum á grønu kósini. Sólorkan er serstakliga áhugaverd í summarhálvuni, tá lutfalsliga nógvir sóltímar eru í Føroyum, samstundis sum tað ofta er lítið av vatni og vindi til vatnorkuverkini og vindmyllurnar.

SEV hevur tí ætlanir um eina royndarverkætlan við sólorku í Sumba, har ein sólorkuskipan ætlandi verður sett upp summarið 2019. Talan verður um eina sólorkuskipan á 200-500 kW, sum kann framleiða nóg mikið av streymi til 35 húsarhald. Sólorkuskipanin er mett at kosta tvær til tríggjar milliónir krónur.

**“Sólorkuskipanir eru skjótar at seta upp, og viðlíkahaldið er sera avmarkað.”**

Ætlanin er at seta sólorkuskipanina á gamla fótbóltsvøllin við Krossin í Sumba, har bygdarráðið hevur samtykt at játta SEV loyvi til verkætlanina. Harumframt skulu loyvi frá friðingarmyndugleikunum, byggiloyvi og framleiðsluloyvi frá Umhvørvisstovuni fáast til vega, áðrenn verkætlanin kann fara í gongd.

– Tað hevur stóran týdning at fáa sett skjøtil á sólorkuna í Føroyum, tí vit hava møguleika at fáa 5-7 prosent av samlaðu elframleiðsluni, sum er mett til 600 GWt í 2030, burtur úr sólorkuni árliga. Tað er sera gott ískoyti á grønu kósini – serliga um summarið, sigur Terji Nielsen, menningarleiðari hjá SEV.

“Sólorkan er serstakliga áhugaverd í summar-
hálvuni, tá lutfalsliga nógvir sóltímar eru í Føroyum,
samstundis sum tað ofta er lítið av vatni og vindi
til vatnorkuverkini og vindmyllurnar.”



*Tilgjørd mynd við sólorkuskipan á gamla fótbóltsvøllinum við Krossin í Sumba.*

*Terji Nielsen, menningarleiðari hjá SEV, hevur royndarverkætlanina í Sumba um hendi.*

## Sólorkan

Menningarleiðarin vísir á, at sólorkuskipanirnar eru vorðnar so bíligar, at tær eisini eru áhugaverdar fyri eitt lítið oyggjasamfelag sum Føroyar, tó at ein sólorkuskipan í Føroyum ongantíð fer at framleiða líka nógv, sum slíkar skipanir framleiða í teimum sólríkaru londunum.

Sólorkuskipanirnar framleiða elorku bæði burtur úr beinleiðis sólargeislum og óbeinleiðis sólargeislum í ljósinum, og tí eru sólorkuskipanir egnaðar at brúka í Føroyum, sjálvt um sólin ikki skínur alla tíðina. Tað fæst nógv meira orka burtur úr beinleiðis sólargeislum sammett við framleiðslu úr ljósinum.

Tað eru serliga tvær orsøkir til, at sólorka er áhugaverd í Føroyum. Onnur er alsamt lækkandi kostnaðurin á sólorkutøknini, sum síðani 2006 er fallin meira enn 75 prosent. Hin orsøkin er áhugaverda samsvarið millum vindorku, vatnorku og sólorku, har mest av sólorku er til taks um summarið, tá ið minst fæst burtur úr vatni og vindi.

Sólorkuskipanir eru skjótar at seta upp, og viðlíkahaldið er sera avmarkað. Tveir hættir eru at seta sólorku upp. Ein møguleiki er, at vanlig húsarhald fáa sær minni sólorkuskipanir á sethúsini og soleiðis framleiða ein part av egnari nýtslu. Tann parturin av framleiðsluni, ið ikki kann brúkast innanhýsis, verður seldur til SEV. Hin hátturin er at gera størri sólorkuskipanir, ið kunnu setast á størri fløtur, sum eru hóskandi til slíkar skipanir. Og tað er ætlanin í Sumba, har gamli fótbóltsvøllurin longu eru sléttur og klárur at verða undirstøði undir einari sólorkuskipan.

# Sundsverkið fingið altjóða góðkenning fyri gott arbeiðsumhvørvi

Arbeiðsumhvørvið á Sundsverkinum var í 2018 altjóða góðkent eftir spildurnýggjum ISO-leisti. Verkið á Sundi er millum fyrstu arbeiðspláss í umleið 170 londum, sum hava fingið hesa góðkenning





**“Sundsverkið er annað arbeiðsplássið í danska ríkinum, sum FORCE Certification hevur góðkent.”**

# Sundsverkið fingið altjóða góðkenning fyri gott arbeiðsumhvørvi

Sundsverkið var í 2018 altjóða góðkent fyri sítt góða arbeiðsumhvørvi eftir einum spildurnýggjum ISO-leisti, nevndur DS/ISO 45001:2018, sum var brúktur fyrstu ferð í 2018. Umleið 170 lond eru við í ISO-góðkenningarskipanini, og Sundsverkið er sostatt millum fyrstu arbeiðspláss um allan heim, sum hevur fingið hesa góðkenning.

Tað er danska góðkenningarfelagið, FORCE Certification, ið góðkendi arbeiðsumhvørvið á Sundsverkinum. FORCE Certification er einasta góðkenningarfelag í danska ríkinum, sum hevur heimild at góðkenna fyritøkur eftir DS/ISO 45001:2018, og Sundsverkið er annað arbeiðsplássið í danska ríkinum, sum FORCE Certification hevur góðkent.

– Talan er um ein standard, sum tryggjar eitt gott arbeiðsumhvørvi, og næsta stigið hjá okkum er at víðka góðkenningina til alt SEV, sigur Annika F. Berg, leiðari fyri heilsu, trygd og umhvørvi hjá SEV.

Slíkar góðkenningar eru ikki ókendar hjá SEV, sum áður hevur fingið góðkenningar innan umhvørvisvernd. Umhvørvisleiðsluskipanin á Sundsverkinum var fyri fyrstu ferð altjóða góðkend eftir DS/EN ISO 14001 í 2010, og tá Sundsverkið fekk hesa góðkenning endurnýggjaða í 2014, var tað við sera góðum skotsmálum. Seinni var umhvørvisverndin hjá øllum elfelagnum góðkend eftir ISO 14001 leistinum, hóast kravið er, at bara Sundsverkið og Vágsverkið skulu hava hesa góðkenning.

– Eg taki hesar góðkenningar sum eitt herðaklapp til bæði leiðslu og starvsfólk, og tað gevur okkum áræði áhaldandi at menna SEV sum arbeiðspláss, sigur Annika F. Berg, HTU-leiðari.

**“Talan er um ein standard, sum tryggjar eitt gott arbeiðsumhvørvi, og næsta stigið hjá okkum er at víðka góðkenningina til alt SEV.”**





*Annika F. Berg, HTU-leiðari hjá SEV, sigur, at ælanin er, at alt SEV skal góðkennast eftir sama ISO-standardi fyri arbeiðsumhvørvi, sum Sundsverkið er góðkent eftir. Á myndini vinstrumegin: Gunnhildur Øster Bech, elektrikari hjá SEV.*



*Jørgin Mørkøre, verkmeistari á Sundsverkinum.*



# Fyrsta stóra HTU-málið er rokkið

**SEV vil vera millum fremstu fyritøkur innan heilsu, trygd og umhvørvi. Fyrsta stóra málið er rokkið við leiðsluskipanini innan arbeiðsumhvørvi, ið Sundsverkið fekk altjóða góðkenning fyri í fjør, og sum verður sett í verk allastaðni í SEV**



*Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, valdi at skipa heilsu, trygd og umhvørvi sum serstakt virkisøki undir einum HTU-leiðara, tá hann tók við stjórastarvinum í SEV fyri góðum 10 árum síðani.*

Tað tekur sína tíð at skipa og byggja upp nýggj virkisøki, og eftir 10 árum kundi SEV í 2018 staðfesta, at fyrsta stóra málið innan heilsu, trygd og umhvørvi, HTU, var rokkið.

Talan er um leiðsluskipanina á Sundsverkinum, sum í 2018 var altjóða góðkent fyri sítt góða arbeiðsumhvørvi eftir einum spildurnýggjum ISO-leisti, nevndur DS/ISO 45001:2018. Henda skipanin skal síðani breiðast út um alt SEV.

Í 2008 fór SEV miðvíst í holt við at skipa HTU-økið, eftir at Hákun Djurhuus hevði tikið við stjórastarvinum í elfelagnum 1. januar sama ár.

– Í mínari verð var eingin ivi um, at SEV sum størsta orkufelag í Føroyum skuldi skipa HTU sum serstakt virkisøki við einum HTU-leiðara, tó at felagið sjálvsagt longu virkaði eftir galdandi lógum og reglum á økinum, greiðir Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, frá.

Annika F. Berg, verkfrøðingur, var síðani, 1. oktober 2008, sett sum HTU-leiðari við beinleiðis tilvísing til stjóran, og hennara uppgáva var fyrstu árini at leggja lunnar undir hetta nýggja virkisøkið.

**“HTU er bæði ein spurningur um persónligan tryggleika, har SEV skipar starvsviðurskiftini hjá tí einstaka á ein tryggan og virðiligan hátt.”**

## HTU sum serstakt virkisøki

– Fyrsta stigið var at skipa HTU-virksemið í eitt samanhangandi øki í samsvari við galdandi lóggávu, og vit settu okkum eisini sum mál at gerast millum tær bestu fyritøkurnar at røkja heilsu, trygd og umhvørvi bæði mótvegis starvsfólkum og samfelagnum sum heild, sigur Annika F. Berg, HTU-leiðari.

Stjórin og HTU-leiðarin vísa bæði á yvirskipaða týdningin av HTU-virkseminum fyri einstøku starvsfólkini og fyri SEV sum arbeiðspláss.

– Vit læna starvsfólkini frá teirra familjum, konum, monnum og børnum, og tað er okkara skylda at ansa væl eftir teimum, meðan tey eru til arbeiðis, sigur Annika F. Berg og leggur dent á, at í roynd og veru snýr tað seg í stóran mun um tryggleika og góða heilsu.

Hin parturin er umhvørvisvernd og umhvørvisleiðsla, har SEV m.a. altíð hevur lagt doyðin á at fara væl um náttúruna og ganga væl frá teimum útbyggingum, sum elfelagið hevur staðið fyri.

– HTU er bæði ein spurningur um persónligan tryggleika, har SEV skipar starvsviðurskiftini hjá tí einstaka á ein tryggan og virðiligan hátt, og harumframt hevur HTU stóran týdning fyri SEV sum fyritøku, tí tá starvsfólkini arbeiða í væl skipaðum kørmum, so verður SEV sum elfelag eisini eitt effektivari elfelag, sigur Hákun Djurhuus.

## SEV ein týðandi leikari

Stjórin vísir á, at í samfelagsmyndini er SEV ein sera týðandi leikari, sum við elorku heldur øllum samfelagshjólunum koyrandi, og henda sannroynd ber við sær, at tað altíð er skjótt og lætt at finnast at SEV. Tí er alneyðugt, at øll virkisøki í elfelagnum eru væl skipað, og at elfelagið er ein fyrimynd – eisini tá talan er um umhvørvisvernd.

HR-økið í SEV hevur høvuðsábyrgdina av trivnaðinum hjá starvsfólkunum, og eitt væl skipað HTU-øki stuðlar væl upp undir trivnaðin.

– Tá fólk verða skadd ella gerast sjúk í arbeiðinum, so er tað mítt borð sum HTU-leiðari, men dagligi trivnaðurin liggur hjá HR-leiðaranum. Sostatt eru okkara starvsøki í ávísan mun flættað saman. Tað er ein styrki, at vit hava eitt ávíst natúrligt samstarv, tá tað snýr seg um starvsfólkahópin, sigur Annika F. Berg.

Stjórin og HTU-leiðarin hava eftir hesi fyrstu 10 árini umhugsað eitt nýtt HTU-mál, og tað er at góðskutryggja alt virksemið hjá SEV eftir ISO 9001 leistinum, men enn er støða ikki tikin til henda spurningin.





# Starvsfólk skulu vera tilvitað um KT-trygdina

## KT er ein sera stórur partur av virkisgrundarlagnum hjá SEV, og tí skal KT-trygdin áhaldandi vera frammarlaga í huganum hjá starvsfólkunum hvønn einasta dag

Seinastu 20 árini er alt virksemið hjá SEV vorðið altsamt meira knýtt at KT, tað veri seg innan elframleiðsluna, elnetið og seinnu árini eisini í samskiftinum við kundarnar ígjøgnum fjaravlisnar elmálarar.

Hendan gongdin hevur havt við sær, at tað er alneyðugt, at øll starvsfólk hava eina ávísa tilvitan um týdningin av KT-trygdini – alt frá at tey gera sær til vana at læsa telduna, tá tey fara frá henni, og til sum heild at vera varin á netinum og sosialum miðlum.

– Tað skal einki hol vera í KT-skipanini, og slík hol kunnu lættliga taka seg upp í skipanini, um starvsfólkini ikki eru tilvitað um KT-trygdina. Brek í KT-skipanum og teldusníkar



*Niels Hansson, KT-leiðari hjá SEV.*



*Kunningartøknin er vorðin inngrógvin partur av øllum arbeiði hjá starvsfólkunum í SEV. Á myndini Brian Joensen, deildarleiðari á Eltøknideildini.*

eru vandar, ið alsamt lúra, men líka stórur vandi er á ferð, um starvfólkini ikki hugsa um trygdina., sigur Niels Hansson, KT-leiðari hjá SEV.

Hann vísir á, at starvsfólk, sum eru gáloysin, tá tað ræður um KT-trygd, eru í roynd og veru ein stórur vandi fyri eina fyritøku. Tí er áhaldandi neyðugt at minna starvsfólk á, at tey øll hvør í sínum lagi hava ábyrgd av KT-trygdini.

– Hetta ljóðar kanska ógvisligt, men innan KT-trygd er tað veruliga ein sannroynd, at eingin veikur liður skal vera til staðar, og um vit varnast ein veikan lið, so skal alt gerast fyri at styrkja hendan partin beinanvegin, sigur Niels Hansson.

"Awareness" er vorðið eitt hugtak, sum KT-leiðslur dagliga brúka sum leiðsluamboð. Tað snýr seg m.a. um upplýsandi KT-tiltøk fyri starvsfólkum, umframt at starvsfólk eru til reiðar at svara spurningum, sum hava til endamáls at royna teirra vitan um KT-trygdina.

– Umframt at hava upplýsandi tiltøk um KT-trygd fyri øllum starvsfólkum, so er eisini neyðugt at hava beinleiðis samband við tann einstaka fyri at kanna hansara trygdartilvit, greiðir Niels Hansson frá.

# Reint og trygt Sundsverk



**Stórur dentur verður lagdur á reinføri og veitingartrygd á nýggja Sundsverkinum, sum byggir brúgv ímillum eina farandi tíð við oljunýtslu og eina grøna framtíð við ongari olju**





**"Stórur dentur verður lagdur á, at reinførið er í hásæti við øllum neyðugum roykreinsingum og annars sambært galdandi krøvum."**

SEV strembar áhaldandi eftir so nógvari grønari orku sum gjørligt. Tó er neyðugt at byggja Sundsverkið út við einari støð 3, tí oljan verður framvegis neyðug tiltakstrygd, eisini tá elorkan á landi í Føroyum verður 100 prosent grøn í 2030.

Høvuðsendamálið við verkinum er at veita trygga orku til eina og hvørja tíð, eisini um grønar orkukeldar eina ferð í framtíðini møguliga svíkja av breki ella onkrari aðrari orsøk. Hóast talan er um eitt oljurikið verk, so skal Sundsverkið hóska so væl sum gjørligt til grønu framtíðina.

– Stórur dentur verður lagdur á, at reinførið er í hásæti við øllum neyðugum roykreinsingum og annars sambært galdandi krøvum, samstundis sum Sundsverkið verður ein týðandi partur av grundarlagnum undir veitingartrygdini, sigur Dávur Reinert Hansen, verkætlanarleiðari.

Hann vísir á, at harumframt kunnu motorarnir tillagast til at brenna gass í staðin fyri olju, um ein gassgoymsla verður bygd í Føroyum seinni. Byggingin av nýggja Sundsverkinum fór í gongd í februar 2017, og arbeiðið gongur sum ætlað.

## Byggiarbeiðið

Talan er um eitt umfatandi byggiarbeiði. Fyri at stuðla upp undir elframleiðsluna er tørvur á ymiskum skipanum við tilknýti til motorarnar – so sum brennievnisveiting, smyrjioljuveiting, kølivatnsskipanir, luftskipanir og skipanir til uppsamling og reinsing av frárensli. Somuleiðis eru skipanir til endurvinning av avlopshita til fjarhita, umframt skipanir til roykreinsing og ljóðdoyving partur av byggiarbeiðinum.

Á verkinum eru eisini ljósmotorar, skipanir til elveiting á verkinum, skipanir til at stýra útgerðini, brunaávaringarskipanir og aðrar trygdarskipanir. Í bygninginum eru harumframt verkstøð til viðlíkahald av verkinum umframt goymsla við neyðugum eykalutum.

Arbeiðið fevnir um veiting av motorum og generatorum, veiting og uppseting av mekaniskari og elektriskari útgerð, uppseting av motorum og generatorum og bygging av verksbygninginum og koplingarstøðini við síðuna av verkinum.

Verkætlanin er skipað millum tveir arbeiðstakarar, sum hava høvuðsábyrgdina av ávíkavist bygging umframt mekaniskari og elektriskari uppseting. Hvør teirra hevur fleiri arbeiðslið, so arbeitt verður á fleiri støðum í senn, eins og undirarbeiðstakarar verða nýttir til serligar veitingar.



## BYGGIGONGDIN 2018

**Í januar** kom rættilig gongd á betongarbeiðið, sum helt fram við stoyping av kjallarum, undirstøði og rørtunli.

**Í apríl** var fyrsti kjallarin liðugt stoyptur, og uppseting av mekaniskari útgerð byrjaði.

**Í mai** vóru undirstøðini til motorarnar liðug, og fyrstu undirstøðini til koplingarstøðina vóru stoypt.

**Í juni** vóru betongelementini til koplingarstøðina sett upp, og pumpuhúsið við kølivatnsinntaki var innilokað.

**Í juli** komu motorar og generatorar til landið og vóru settir upp á pláss.

**Í august** mánaði vóru traverskranar í motorhøllum og pumpuhúsi settir upp, eins og farið var at seta útgerð inn í koplingarstøðina.

**Í september** var farið undir at leggja fjarhitaleiðingar í lendið, og undirstøðið til skorsteinin var stoypt.

**Í oktober** vórðu motorhallirnar innilokaðar, og uppseting av elektriskari útgerð byrjaði.

**Í november** var útgerðin í fyrra ketilrúminum sett inn og rættað av. Byrjað var upp á uppseting av mekaniskari útgerð í pumpuhúsinum.

**Í desember** var meginparturin av koplingarstøðini innilokaður, og byrjað var upp á elinnleggingina.

Nógva og umfatandi stoypiarbeiðið krevur, at arbeitt verður við stórum forskallingarflakum, og stundum hevur vindur ávirkað hetta arbeiðið. Samskipanin av byggiarbeiði og uppseting av stórari og tungari mekaniskari útgerð er sera krevjandi. Men samanumtikið hevur arbeiðið gingið væl við nærlagni frá arbeiðsfólki og leiðslu á staðnum.

Byggingin verður væntandi liðug í 2019, og royndarframleiðslan byrjar eftir ætlan heystið 2019. Samlaði kostnaðurin væntast at vera innan fyri játtanina.

# Fossáverkið framleitt elorku í 65 ár

## 65 ár eru liðin, síðani Fossáverkið í Vestmanna framleiddi fyrstu elorkuna. Verkið hevur øll árini eisini samskipað alla elframleiðsluna út á elnetið



Fossáverkið í Vestmanna varð alment tikið í nýtslu 5. mai 1954, tá stórt hátíðarhald, har m.a. umboð fyri løgtingið, landsstýrið og donsku stjórnina vórðu boðin við. Ferðamannaskipið Tjaldrið kom á Vestmanna við nógvum gestum, og um kvøldið var veitsla í fimleikarhøllini í Vestmanna skúla, har 220 fólk vórðu boðin at hátíðarhalda hetta fyrsta stóra úbyggingarstigið hjá SEV.

Vatnorkuútbyggingarnar í Vestmanna í 50-unum, sum fevndu um byrgingar oman fyri bygdina, tunnilsarbeiði, rørleiðingar, koplingarstøð, netútbyggingar og Fossáverkið, var største byggiarbeiði, sum føroyingar nakrantíð høvdu sett sær fyri.

Fyrsta elorkan var kortini framleidd á Fossáverkinum og leidd út á elnetið nakrar mánaðir frammanundan stóra hátíðardegnum. Mikudagin 2. desember 1953, kl. 16.30, var verkið royndarkoyrt fyrstu ferð, tá streymur var settur til á verkinum og til býlingin, Fitjarnar, í Vestmanna – nærhendis Fossáverkinum.

Eitt korter seinni fór elorkan út á Tórshavnarlinjuna. 5 og 6. desember vóru ávikavist Vestmannalinjan og Eysturoyarlinjan settar til. Síðani vóru fleiri bygdir knýttar upp í elnetið hjá SEV allan desember 1953. Býlingurin á Fjørðinum í Vestmanna, har Fossáverkið liggur, var síðsta økið, sum var koplað til elnetið í hesum fyrsta byggistiginum av elskipanini hjá SEV. Tað hendi 22. desember, og tá fekk øll Vestmanna bygd streym frá SEV.

Fossáverkið hevur øll 65 árini havt týðandi leiklutin at samskipa elframleiðsluna frá ymsu verkunum út á elnetið, og í 2015 var kontrolrúmið umvælt og dagført, tá høvuðsumvælingar vóru gjørdar á verkinum.

Í januar 1954 vísti ein uppgerð, at 1300 húsarhald fingu streym frá Fossáverkinum, og at roknað var við, at tilsamans 2000 brúkarar skuldu bindast í elnetið í hesum fyrsta umfarinum.

Fyrstu tíðina lá elnýtslan á umleið 600 kW, t.e. lastin á framleiðslueindunum, og mesta lastin hevði tá verið uppi á 800 kW. Tað er 1,4 prosent av mestu lastini í allari elskipanini hjá SEV í dag, sum í november í 2018 var uppi á góðum 58 MW.

Fyrru byrgingarnar, sum vóru bygdar í Vestmanna í sambandi við Fossáverkið, vóru byrgingarnar frammi við Vatnið í Fonsdali og á Lómundaroyrum. Síðani helt vatnorkuútbyggingin í Vestmanna fram árini 1956 til 1963. Tá varð vatnorkan bygd út á Mýrunum og í Heygadali, og Mýruverkið og Heygaverkið vóru tikin í nýtslu.



*Fossáverkið í Vestmanna fór undir royndarframleiðslu 2. desember 1953. útbyggingarnar av vatnorkuni í Vestmanna vóru største byggiverkætlan, sum føroyingar nakrantíð høvdu sett sær fyri. Fossáverkið hevur øll 65 árini samskipað elframleiðsluna frá øllum elverkunum út á elnetið.*





# Avmynstring – góðir vanar í góðari tíð

SEV leggur stóran dent á at hjálpa og stuðla sínum starvsfólkum at fara lagaliga av arbeiðsmarknaðinum, tá pensjónistatilveran bankar uppá. Tað snýr seg um at byggja upp góðar vanar í góðari tíð, sigur HR-leiðarin



*Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari í SEV, v.m. í hugnaligum práti við Binu Miðberg, sum hevur starvast hjá elfelagfnum í slaka hálva øld.*

# Avmynstring



“Offboarding”, sum í hesum viðfangi merkir avmynstring av arbeiðsmarknaðinum, er eitt hugtak, ið so líðandi er vorðið sjónligari í starvsfólkarøktini hjá SEV.

– Tað snýr seg í roynd og veru um, at starvsfólk fyrireika seg at fara av arbeiðsmarknaðinum, áðrenn tey standa á gáttini til pensjónistatilveruna, umframt at arbeiðsplássið hjálpir teimum í fyrireikingunum. Á henda hátt verður fráferðin av arbeiðsmarknaðinum lagalig og góð, sigur Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari hjá SEV.

Hon hevur í sínari masterritgerð í positivari sálarfrøði kannað nærri hugtakið “offboarding”, sum í hesum høpi merkir avmynstring av arbeiðsmarknaðinum. Í ritgerðini hevði hon interview við seks starvsfólk hjá SEV. Trý teirra vóru farin frá við pensjón, og hini trý nærkaðust pensjónsaldrinum. Ein niðurstøða hjá teimum seks fólkunum var, at tá HR-leiðarin varpaði ljós á evnið “offboarding”, so høvdu tey í størri mun tosað við hjúnafelagan, familju og vinir um viðurskifti, sum hava við pensjónistatilveruna at gera.

Nøkur av hesum fólkum søgdu, at tey høvdu fingið meira innlit og nýggjar vinklar í samrøðunum heima, og tey upplivdu hetta soleiðis, at tey høvdu fingið meira greiði á triðja lívsskeiðinum, sum lívið eftir virknu starvsárini eisini verður rópt.

## Ein samfelagsskylda

Kanningar í Danmark vísa, at umleið 50.000 danir yvir 65 ár kenna seg einsamallar, og umrokna vit hetta til føroysk viðurskifti, so er sannlíkt, at umleið 420 føroyingar yvir 65 ár kenna seg einsamallar.

– Summi gerast veruliga kedd av at skula pensjónerast og fara fra vegna aldur. Eg meti, tað er ein samfelagsskylda hjá arbeiðsplássum at hjálpa starvsfólkum fram til eitt innihaldsríkt pensjónistalív, sigur Bergtóra Høgnadóttir.

Fyri góðum fimm árum síðani var ein sonevdnur 60+ bólkur stovnaður í SEV, sum var fyrsta stigið at byggja upp eina miðvísa seniortilgongd í elfelagnum fyri fólk, sum eru eldri enn 60 ár, og teirra makar. Í hesum bólki, sum hevur skipað fyri nógvum viðkomandi tiltøkum, hittast eisini fyrrverandi starvfólk í SEV, sum eru farin frá vegna aldur.

– Samanumtikið er 60+ bólkurin eitt væleydnað átak, og vit royna nú áhaldandi at styrkja seniortilgongdina, so tey seinastu árini á arbeiðsplássinum og tilveran eftir virkna arbeiðslívið gerast so góð, sum til ber, sigur Bergtóra Høgnadóttir.

Hon hevur tað fakliga sjónarmið, at arbeiðsgevarin hevur skyldu til at geva starvsfólkunum eina góða byrjan á arbeiðsplássinum, at trivnaðurin er góður, meðan fólk eru í starvi, og at arbeiðsgevarin eisini skal kýta seg at gera ferðina av arbeiðsmarknaðinum góða og innihaldsríka.

## Góðir ambassadørar

– Fólk vilja starvast har, sum tað er gott at vera. Um fólk ikki hava ov nógv at stríðast við tey síðstu starvsárini, tí tey eru komin til sættis við pensjónistatilverua, so hava tey sjálvsagt eisini meira orku at leggja í tey síðstu arbeiðsárini, sum arbeiðsplássið fær ágóðan av.



**“Summi gerast veruliga kedd av at skula pensjónerast og fara frá vegna aldur. Eg meti tað er ein samfelagsskylda hjá arbeiðsplássum at hjálpa starvsfólkum fram til eitt innihalds-ríkt pensjónistalív.”**

HR-leiðarin vísir á, at um arbeiðspláss og leiðslur leggja dent á eina góða avmynstring, so fáa tey eisini nøkur fráfarandi starvsfólk, sum gerast góðir ambassadørar fyri fyritøkurnar.

Bergtóra Høgnadóttir er sannførd um, at tað gagnar bæði arbeiðsplássum og teimum starvsfólkum, sum nærkast pensjónini at fyrireika triðja lívskeiðið væl. Hon mælir til, at fakfeløgini í størri mun royna at fáa hesi viðurskifti inn í sáttmálar, og at politikarar eisini hava avmynstring av arbeiðsmarknaðinum í huganum og ikki bert pensjónsaldur, krónur og oyru, tá teir viðgera viðurskiftini hjá borgarum, sum eru komnir upp í árini.

– Tað snýr seg ikki bert um at leggja ár í lívið, men eisini um at leggja lív í árini, staðfestir Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari hjá SEV, at enda við orðunum hjá navnframa amerikanska forsetanum Abraham Lincoln.

# Starvsfólkini hjá SEV

**Við árslok 2018 vóru 156 fólk í føstum starvi hjá SEV. Nógv tann størsti parturin av starvsfólkahópinum starvaðist innan framleiðsluna – nevniliga 66 fólk. Fleiri av størvunum innan framleiðslupartin eru mannað allan sólarringin. Á Sundsverkinum eru altíð tveir mans á vakt í senn**

Um vit dvølja við fakligu førleikarnar hjá starvsfólkahópinum, hevur meginparturin maskin- ella el-útbúgving. Størsti fakbólkurin hjá SEV eru maskinmeistararnir.

Av teimum 156 fólkunum í føstum starvi teljast 26 konufólk.

## Aldur

Miðalaldurin á starvsfólkahópinum er hækkaður eitt vet til beint undir 51 ár. Vert er at hava í huga, at fráfaringaraldurin hjá SEV er farin úr 67 árum upp í 70 ár. Hetta hevur nevndin samtykt, lutvíst tí at starvsfólkahópurin er væl fyri og arbeiðssamur, hóast tey gerast 67 ár. Rákið er, at pensjónsaldurin hækkar og seinast, men ikki minst hava starvsfólk hjá SEV stundum verið hugtung um, at fráfaringaraldurin var 67 ár. Hækkaði fráfaringaraldurin ger sjálvsagt, at miðalaldurin hækkar.

Fyri fáum árum síðani var eingin lærlingur hjá SEV, men í desember 2018 vóru heili fimm lærlingar í starvsfólkahópinum. Tveir elektrikaralærlingar, tveir lærlingar innan maskinsmíð og ein skrivstovulærlingur – fýra menn og ein kvinna. Yngsti lærlingurin var bert 15 ár, tá hann byrjaði hjá SEV.

## Tillagað størv

Umráðandi er, at eisini fólk við skerdum arbeiðsførleika hava møguleikan at geva sítt týdningarmikla íkast á arbeiðsmarknaðinum. Hjá SEV eru tveir mans í tillagaðum størvum, sum fyrr nevndist vart starv.

## Starvsaldurin hjá starvsfólkahópinum

Starvsaldurin sigur, hvussu leingi fólk hava starvast hjá SEV. Starvsaldurin er høgur, samanborin við mong onnur arbeiðspláss og havandi í huga, at hákonjunkturur hevur valdað fleiri av seinastu 20 árunum. Helmingurin av starvsfólkahópinum hevur starvast hjá SEV í meiri enn 10 ár. Nøkur teirra yvir 40 ár. Tað sigst, at starvsfólk ofta leita sær nýggjar leiðir, tá arbeiðsloysið er lágt. Í verandi løtu er arbeiðsloysið undir tvey prosent. Kortini er varhugin ikki, at starvsfólkahópurin leitar sær aðrar leiðir. Um fólk fara úr starvi, er tað oftast vegna pensjón, at fólk hava hug at royna sjólívið ella vilja varðveita sína siglingartíð.

Vert er at nevna, at SEV kýtir seg, so starvsfólkahópurin støðugt hevur møguleikan at mennast og gjarna skal vera enn betur fyri fakliga, um tey gevast hjá SEV, enn tey vóru, tá tey byrjaðu hjá SEV.

## Starvsfólkahópurin broyttur nakað

Í 2018 byrjaðu nógv nýggj starvsfólk hjá SEV. Fremsta orsøkin var, at vit settu fimm maskinmeistarar á Sundi, hartil dátugreinara, samskiftisfólk, eftirlitsfólk og elektrikarar. Eisini var talan um nýggj størv og nýggjar fakligar førleikar til frama fyri at røkka málinum um, at Føroyar gerast 100 prosent grønar á landi í 2030, millum annað eitt phd. granskingarstarv innan orkuverkfrøði í samstarvi við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya og Ålborg Universitet.



Í 2018 fingu 225 fólk útgjald gjøgnum lønarskipanina hjá SEV. Í hesum talinum eru 11 fólk, sum hava fingið útgjald í sambandi við nevndararbeiði, 4 tænastumannaeftirlønir, 54 hjálparfólk, avloysarar og fólk í tíðaravmarkaðum starvi umframt 156 fólk í føstum starvi hjá SEV.

# Starvsfólk í føstum starvi




Stabbamyndin vísir, starvsfólk í føstum starvi við ársenda 2009 - 2018.

# Býti av starvsfólkum







Myndin vísir, hvussu tey 156 starvsfólkini í føstum starvi við árslok 2018 eru býtt út á eindirnar.






## Starvsaldur

Miðalstarvsaldurin er 14,6 ár. Í 2018 høvdu 37 fólk ella 24 prosent av starvsfólkunum starvast hjá SEV í 25 ár ella meira.






## Aldur

Miðalaldurin í starvsfólkahópinum er lækkandi. Í 2014 og 2015 var miðalaldurin sløk 50 ár. Í 2016 var miðalaldurin 51,5 ár, í 2017 var hann 50 ár, og í 2018 var hann 50,9 ár.

Stabbamyndin vísir, at sammett við 2017 er ein lítil hækking í starvsfólkabólkunum millum 30 og 69 ár, og at ein lækking er í yngstu bólkunum undir 30 ár.

Við árslok 2018 vóru 38 starvsfólk 60 ár og eldri.

# Heilsa, trygd og umhvørvi

## Heilsu-, trygdar- og umhvørvispolitikkur (HTU)

SEV orðaði hin 17. desember 2008 Heilsu-, Trygdar- og Umhvørvispolitikk (HTU), ið er alment tøkur á heimasíðuni hjá SEV.

## Trygd

SEV er eitt framkomið virki, sum raðfestir trygd og arbeiðsumhvørvi frammarlaga til gagns fyri okkum øll.

## Trygdararbeiði

Í 2018 hevur trygdararbeiðið hjá SEV millum annað snúð seg um at innføra arbeiðsumhvørvisleiðsluskipan eftir ISO 45001:2018 standardinum á Sundsverkið.

Á mynd 1 sæst trygdarskipanin hjá SEV.

## Persónskaðar

Hóast SEV arbeiðir skipað við trygdini, og visjónin er, at eingir skaðar henda, slepst ikki heilt undan skaðum. Á mynd 2 sæst tal av persónskaðum, sum hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin. Í 2018 var ein persónskaði fráboðaður Arbeiðseftirlitinum.

## Umhvørvið

Á mynd 3 sæst ein mynd av høvuðsárinunum, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið í sambandi við elframleiðslu. Vinstrumegin á myndini sæst, hvørji evni verða nýtt í framleiðsluni. Ovast og niðast á myndini sæst, hvørji evni ávikavist verða útleidd til luft og sjógv í framleiðsluni. Á høgru síðu sæst, hvørji evni fáast burtur úr framleiðsluni – til dømis kann nevnast el og fjarhiti.

Tann vanliga elframleiðslan fer fram á 13 verkum, sum framleiða eftir tørvi. Av hesum 13 verkunum eru trý stór oljurikin verk – Strond, Sund og Vágsverkið. SEV hevur seks vatnorkuverk – Strond, Eiðisverkið, Fossáverkið, Mýruverkið, Heygaverkið og verkið í Botni. Harumframt fimm smáverk, sum elveita Fugloy, Mykines, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun.

SEV hevur haraftrat seks vindmyllur í Neshaga í Eysturoynni og 13 vindmyllur í Húsahaga oman fyri Tórshavn.

## TRYGDARNEVND

| Trygdarumboð | Trygdarumboð | Arbeiðsleiðari | Arbeiðsleiðari | HTU leiðari | Stjóri | Deildarstjóri net Rakstrarleiðari | Deildarstjóri framleiðsla | Deildarstjóri fyristing |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Robert Joensen | Vilhelm Hansen | Otto West | Jørgin Mørkøre | Annika F. Berg | Hákun Djurhuus | Jón Nielsen | Heri Mortensen | Bogi Bendtsen |

## TRYGDARBÓLKAR

| BÝTISVIRKIR | | | FRAMLEIÐSLA | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Býtisvirkir Suðurøkið | Býtisvirkir Miðøkið | Býtisvirkir Norðurøkið | Sundsverkið | Verkini í Suðuroy | Verkini í Vestmanna | Verkið á Strond + útoyggjar | Framleiðsla + vatn og vindorka | Fyrisiting | Verkfrøði | Eltøkni + viðlíkahald av vindmyllum | Innlegging |
| Arbeiðsleiðari Otto West | Arbeiðsleiðari Mads á Heyggi | Arbeiðsleiðari Henrik Eskildsen | Arbeiðsleiðari Jørgin Mørkøre | Arbeiðsleiðari Jóanes Norðberg | Arbeiðsleiðari Eyðbjørn F. Petersen | Arbeiðsleiðari Sæmund Tausen | Arbeiðsleiðari Heri Mortensen | Arbeiðsleiðari Bogi Bendtsen | Arbeiðsleiðari Høgni Hansen | Arbeiðsleiðari H. Brian Joensen | Arbeiðsleiðari Dánial Jógvan Hansson |
| ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ | ↓ |
| Trygdarumboð Poul Bech | Trygdarumboð Elias Mikkelsen | Trygdarumboð Robert Joensen | Trygdarumboð Vilhelm Hansen | Trygdarumboð Poul Dan Kjærbo | Trygdarumboð Guttorm S. Joensen | Trygdarumboð Rógvi Rasmussen | Trygdarumboð Karl Martin Klein | Trygdarumboð Katrin Petersen | Trygdarumboð Eirkur Norðberg | Trygdarumboð Morten B. Hansen | Trygdarumboð Anna Vang |

*Mynd 1. Trygdarskipanin hjá SEV.*




*Mynd 2. Tal av persónskaðum, ið hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin, og sum eru fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum.*




*Mynd 3. Yvirlit yvir tey høvuðsárin, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið.*

| GALDANDI UMHVØRVISGÓÐKENNINGAR | Sett í gildi: |
|---|---|
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá SEV í Neshaga | 14.05.04 |
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum á Sundi | 28.03.18 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá Elfelagnum SEV í Neshaganum | 13.01.12 |
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum í Vági | 18.11.15 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá Elfelaganum SEV í Húsahaga | 16.01.13 |

## Útlát av $CO_2$ í 2018




| | |
|---|---|
| Útlát tilsamans: | 105.805 tons $CO_2$ |
| Elframleiðsla í alt: | 351.994 MWt |
| Specifik $CO_2$: | 329 g/kWt |

*Mynd 4. Nøgdin av $CO_2$-útláti í 2018.*

### Umhvørvisgóðkenningar

Fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, ið eru at finna í fylgiskjalinum til Løgtingslóg um umhvørvisvernd, skulu hava eina umhvørvisgóðkenning. Tey virkir ella útbúnaðir, talan er um hjá SEV, eru Sundsverkið, Vágsverkið og vindmyllurnar í Neshaga og Húsahaga. Í 2018 hevur SEV fingið nýggja umhvørvisgóðkenning á Sundsverkinum í sambandi við útbyggingingina av verkinum.

### Útlát til luftina

Eitt tað størsta árinið á umhvørvið er brenningin av fossilum brennievnum. Størsti parturin av $CO_2$-útlátinum frá virkseminum hjá SEV stavar frá oljunýtsluni til framleiðslu. Harnæst stavar $CO_2$-útlátið frá oljunýtsluni til upphiting av bæði bygningum og motorum umframt oljunýtslu til flutning við arbeiðsakførum hjá SEV. Mynd 4 vísir, hvussu stórt útlátið av $CO_2$ var í 2018, og mynd 5 vísir, hvussu stórt útlátið av $CO_2$ hevur verið frá 2008 til og við 2018.




*Mynd 5. Útlátið av $CO_2$, elframleiðsan og specifik $CO_2$ frá 2008-2018.*

## Býtið í prosentum millum termiska og grøna orku 2008-2018




*Mynd 6. Termiska og grøna orkan í prosentum.*

Yvirskipaða málið hjá SEV er at gerast 100% grøn í 2030. Á myndini omanfyri sæst, hvussu býtið er millum grønu og termisku framleiðsluna hjá SEV, eisini sæst, hvussu elframleiðslan økist frá 2008 til 2018. Síggjast kann, at framleiðslan úr grønari orku var 49% í 2018.

Seinastu árini hevur SEV keypt fleiri elbilar, hetta millum annað fyri at minka útlátið av $CO_2$. Í 2018 hava diesel- og bensinbilarnir hjá SEV útleitt í miðal 3,9 tons av $CO_2$ pr. bil í 2018, meðan elbilarnir hava í miðal útleitt 0,8 tons $CO_2$ pr. bil.

### Burturkast

Gjøgnum virksemið hjá SEV verður nógv burturkast framleitt. Ein stórur partur av tí framleidda burturkastinum verður brent og endurnýtt, og eisini verður burturkast sent til serviðgerð, hetta er tað, sum kallast serligt dálkandi burturkast – eitt nú kemikaliirestir.






*Mynd 7. Yvirlit yvir burturkast til brenning, tyrving, endurnýtslu og serligt dálkandi fyri 2017 og 2018.*

Í sambandi við grevstur verður nógv mold, grót o.a. latið til tyrvingarplássini. Vanliga verður tað, ið verður tyrvt, roknað sum serliga tyngjandi fyri umhvørvið, men tá ið hesi í flestu førum eru ódálkað mold og grót, sum verða endurnýtt, eru hesi tøl ikki tikin við í yvirlitinum. Ein onnur orsøk er, at tað er torført at fáa savnað øll hesi tøl, tí at tey í fleiri førum eru tongd at ymiskum verkætlanum, har onnur gera hetta arbeiðið fyri okkum.

Á mynd 8 sæst yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu fyri 2017 og 2018. Størsti parturin av burturkastinum til endurnýtslu er spillolja, sum verður latin IRF. Eisini er jarn og metal ein stórur partur. Í 2018 hevur verið ruddað upp hjá SEV serliga á Havnarverkinum, og hetta kann síggjast millum annað við at størri nøgdir av burturkasti er latið ávikavist til KB, sum serligt dálkandi burturkast og til IRF, sum elektronikkur og káplar.




*Mynd 8. Yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu fyri 2017 og 2018.*

# Ársfrágreiðing & ársroknskapur 2018

# Elfelagið SEV
# Ársfrásøgn fyri 2018

## Innihald


Upplýsingar um felagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 58
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 59
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . . . 60
Høvuðs- og lyklatøl. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 62
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 63
Nýttur roknskaparháttur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 77
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember . . . . . . . . 80
Fíggjarstøða 31. desember . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 83
Virkisbýti, framleiðsla og net . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 84
Rakstrarbýti, framleiðsla og net. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 87
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 89


## Felagið

Elfelagið SEV
Fyrisiting:
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn
Telefon: 346800
Heimasíða: www.sev.fo
Teldupostur: sev@sev.fo
Heimstaður: Vestmanna
Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

## Nevnd

John Zachariassen, formaður (COB)
Hans Jákup Johannesen, næstformaður
Marin Katrina Frýdal
Jónsvein Hovgaard
Sune Jacobsen
Vinjard Tungá
Kristian Eli Zachariasen

## Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri (CEO)
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisiting (CFO)
Jón Nielsen, deildarstjóri fyri net (COO)
Heri Mortensen, deildarstjóri fyri framleiðslu (CPO)

## Grannskoðan

P/F Januar
Løggilt grannskoðanarvirki
Óðinshædd 13, Postboks 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 Telefaks: 35 17 01
Teldupostur: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 hjá Elfelagnum SEV samtakinum.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at samtaks- og ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av samtaksins og móðurfelagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi samtaksins og móðurfelagsins og av peningastreyminum hjá samtakinum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018.

Leiðslufrágreiðingin rúmar, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn, hin 5. apríl 2019

### Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

### Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

### Nevnd

*John Zachariassen*
*Formaður*

*Hans Jákup Johannesen*
*Næstformaður*

*Marin Katrina Frýdal*

*Jónsvein Hovgaard*

*Sune Jacobsen*

*Vinjard Tungá*

*Kristian Eli Zachariasen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til kapitaleigararnar í Elfelagnum SEV

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá Elfelagnum SEV fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognaruppgerð og notum fyri bæði konsernina og felagið umframt pengastreymsuppgerð fyri konsernina. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2018 hjá konsernini og felagnum, av úrslitinum av virkseminum hjá konsernini og felagnum umframt av pengastreymunum hjá konsernini í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin". Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av konsernroknskapinum og ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá konsernroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er við- komandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megna at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

- Fáa hóskandi og egnað grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um fyritøkurnar ella handilsvirksemið í konsernini til tess at røkka eini niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni. Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um konsernroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av konsernroknskapinum og ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 5. apríl 2019

P/F JANUAR

løggilt grannskoðanarvirki

| | |
|---|---|
| Hans Laksá | Jógvan Amonsson |
| Statsaut. revisor | Statsaut. revisor |

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í tkr. | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 427.460 | 432.277 | 420.270 | 421.952 | 410.551 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 197.097 | 226.255 | 243.621 | 221.483 | 155.573 |
| Rakstrarúrslit | 81.960 | 123.513 | 150.383 | 127.897 | 78.376 |
| Fíggjarligir postar, netto | -34.634 | -32.948 | -48.286 | -24.830 | -20.613 |
| Ársúrslit | 38.084 | 88.974 | 92.754 | 103.067 | 57.763 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 2.722.020 | 2.447.178 | 2.303.961 | 1.960.373 | 1.742.038 |
| Tøkur peningur | 190.785 | 247.993 | 335.498 | 221.889 | 131.459 |
| Eginogn | 1.207.723 | 1.196.397 | 1.141.003 | 1.042.921 | 939.854 |
| Langfreistað skuld | 1.341.582 | 1.133.188 | 1.042.116 | 830.000 | 691.411 |
| **Lyklatøl *)** | | | | | |
| Renting av eginogn | 3,2% | 7,6% | 8,1% | 10,4% | 6,3% |
| Ognaravkast | 3,2% | 5,2% | 7,1% | 6,9% | 4,9% |
| Skuld netto/EBITDA | 6,2 | 4,2 | 3,1 | 2,8 | 3,6 |
| Ognarumferð | 0,16 | 0,18 | 0,18 | 0,22 | 0,24 |
| Eginognarpartur | 44,4% | 48,9% | 49,5% | 53,2% | 54,0% |

## Útrokning av lyklatølum

Renting av eginogn = $\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$

Ognaravkast = $\frac{\text{Úrslit av primerum rakstri x 100}}{\text{Miðalvirði av aktivum}}$

Nettoskuld/EBITDA = $\frac{\text{Nettoskuld (skuld – tøkur peningur)}}{\text{EBITDA}}$

Ognarumferð = $\frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

Eginognarpartur = $\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010“.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Sambært elveitingarlógini §3, stk 1 stendur, at kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi sambært § 1, stk 1 uttan mun til ásetingar í §50, stk 1 í kommunustýrislógini. Í sambandi við at elveitingarøkið partvíst bleiv liberaliserað, fingu kommunurnar heimild til at reka elframleiðslu á vinnuligum grundarlagi.

Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi. Eftir elveitingarlógini skal SEV (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Í loyvunum hjá SEV fyri einstøku framleiðslueindirnar framgongur, at av roknskapinum skal framganga, hvørt framleiðslueindin hevur yvir- ella undirskot.

Allar kommunur í Føroyum eru limir í SEV. Limirnir heftu fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 hefta kommunurnar einans fyri felagsins skyldum mótvegis starvsfólkunum. Inniverandi frágreiðing fevnir um samlaða virksemið hjá felagnum í tíðarskeiðnum 1. januar 2018 - 31. desember 2018.

## Roknskaparliga gongdin í mun til fíggjarætlanina 2018

Til eykaaðalfundin á heysti skal felagið mótvegis eigarunum sambært viðtøkunum § 3, stk. 13b og § 4, stk. 12b kunna um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin, sum var hin 24. apríl 2018. Kunningin var gjørd á eykaaðalfundinum hin 30. november 2018, og víst verður eisini til nærri kunning í frágreiðing til fundin, nevnd "Fíggjargongdin 2018" á heimasíðu felagsins www.sev.fo. Kunningin bygdi á staðfest tøl við endan av september umframt metingar og ætlanir fyri restina av árinum. Í talvu 1 er eisini víst frávik í mun til roknskapin árið fyri og í mun til roknskapin og ætlanina.

SEV hevur við virknaði frá 1. januar 2016 stovnað sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga og Húsahaga. Í móðurfelagsroknskapinum viðførir hetta, at keyp av vindorku fer at økjast, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingar og rentum fer at lækka. Úrslitið

**Talva 1. Frávik millum ætlan, framroknað og roknskap í mió. kr.**

| | Roknskapur 2014 | Roknskapur 2015 | Roknskapur 2016 | Roknskapur 2017 | Roknskapur 2018 | Frávik millum roknskap 2017 og 2018 | Ætlan 2018 | Frávik millum ætlan og roknskap 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumsetningur | 410,6 | 422,0 | 420,3 | 432,3 | 427,5 | -4,8 | 436,1 | -8,7 |
| Oljuútreiðslur | 141,5 | 86,2 | 50,9 | 84,7 | 105,8 | -21,0 | 91,1 | 14,7 |
| Tilfar og tænastur | 49,8 | 49,9 | 59,3 | 53,9 | 50,4 | 3,5 | 52,4 | -2,0 |
| Lønir | 63,6 | 64,3 | 66,5 | 67,4 | 74,2 | -6,8 | 71,9 | 2,3 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **255,0** | **200,5** | **176,6** | **206,0** | **230,4** | **24,3** | **215,3** | **15,0** |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **155,6** | **221,5** | **243,6** | **226,3** | **197,1** | **-29,2** | **220,8** | **-23,7** |
| Avskrivingar | 77,2 | 93,6 | 93,2 | 102,7 | 115,1 | -12,4 | 110,8 | 4,3 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **78,4** | **127,9** | **150,4** | **123,5** | **82,0** | **-41,6** | **110,0** | **-28,0** |
| Rentuútreiðslur netto | 20,6 | 24,8 | 48,3 | 32,9 | 34,6 | -1,7 | 30,4 | 4,2 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **57,8** | **103,1** | **102,1** | **90,6** | **47,3** | **-43,2** | **79,5** | **-32,2** |
| Skattur | 0 | 0 | 9,3 | 1,6 | 9,2 | -7,6 | 0,0 | 9,2 |
| **Úrslit eftir skatt** | **57,8** | **103,1** | **92,8** | **89,0** | **38,1** | **-50,9** | **79,5** | **-41,5** |

frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið í samtaksroknskapinum hjá SEV ávirkast ikki av hesum.

Felagið ætlaði upprunaliga við einum úrsliti í 2018 upp á 79,5 mió. kr., meðan endaliga úrslitið fyri 2018 gjørdist 47,3 mió. kr. áðrenn skatt og 38,1 mió. kr. eftir skatt ella ein afturgongd í mun til ætlað upp á 41,5 mió. kr. eftir skatt. Felagið hevur tí eina afturgongd í mun til ætlað.

Høvuðsorsøkirnar til afturgongdina eru lægri inntøkur, hægri oljukostnaður og hægri avskrivingar og skattur í mun til ætlanina.

Orsøkin til afturgongdina í inntøkunum kemur frá lægri íbindingargjøldum. Ein partur av íbindingargjøldunum sum komu við í 2017 vóru upprunaliga ætlað sum inntøka í 2018, so talan er um forskjóting millum árini. Aðrar inntøkur eru 1,6 mió. kr. lægri enn ætlað. Sølan av KWt og inntøkan frá føstu gjøldunum er sum ætlað.

Oljuútreiðslurnar eru 14,7 mió. kr. hægri enn ætlað grundað á hægri oljuprísir enn upprunaliga mett, javning av goymsluvirði til dagsvirði og størri nýtslu av gassolju og tungolju enn ætlað.

Tað hevur ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og kursinum á dollaranum verður øðrvísi enn ætlað í fíggjarætlanini. Við støði í tí strategi felagið hevur at halda løgdu fíggjarætlanina fyri innkeypið av olju, hevur felagið prístryggjað (hedgað) part av oljukeypinum fyri 2018 til ein hægri prís enn ætlaða kostnaðin av keypinum í fíggjarætlanini.

Í framleiðsluroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo, er oljunýtsla og prísir meiri sundurgreinað og viðmerkt.

Kostnaðurin til tilfar og tænastur er 2,0 mió. kr. lægri enn ætlað. Framleiðslan hevur brúkt 0,5 mió. kr. meiri enn ætlað, og netið hevur brúkt 1,6 mió. kr. minni enn ætlað. Fyrisitingin hevur brúkt 0,9 mió. kr. minni enn ætlað.

Lønarkostnaðurin er 2,3 mió. kr. hægri enn ætlað og høvuðsorsøkin til hesa hækkan er hægri avseting til frítíðarløn við 4,0 mió. kr. Um hædd ikki verður tikið fyri hesi avseting av lønarkostnaðinum, eru lønarútreiðslurnar lægri enn ætlað.

Ætlað var við avskrivingum fyri 110,8 mió. kr. Hesar gjørdist 115,1 mió. kr. svarandi til, at hesar eru 4,3 mió. kr. hægri enn ætlað. Avskrivingarnar eru øktar seinastu árini, og øktu avskrivingarnar stava frá teimum íløgum og tilgongd til avskrivingar, sum felagið hevur gjørt seinastu árini. Gjørdar verða metingar av, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva upp á ognina. Munurin millum staðfestu og ætlaðu avskrivingarnar hevur støði í hesum metingum og veruligum staðfestingum, eins og íløgurnar vóru lægri enn ætlað.

Kostnaðurin fyri rentur og provisión gjørdist 34,6 mió. kr. harav ikki staðfestur kursvinningur er 8,9 mió. kr., meðan ikki staðfest javning av fíggjarligum amboðum er ein útreiðsla á 7,4 mió. kr.

Samanumtikið kann sigast, at afturgongdin í úrslitinum upp á 41,5 mió. kr. í mun til ætlað í høvuðsheitum er grundað á fýra høvuðsbólkar í rakstrinum. Hesir eru nettoumsetningurin, serliga

| **Talva 2. Uppgerð yvir inntøkur frá streymsølu og føstum gjaldi frá kundabólkum í mió. kr.** | **Roknskapur 2017** | **Roknskapur 2018** | **Frávik millum roknskap 2017 og 2018** | | **Ætlan 2018** | **Frávik millum ætlan og roknskap 2018** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tilsamans | Tilsamans | Í krónum | % | Tilsamans | Í krónum | % |
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 47,7 | 65,1 | 17,3 | 36,3 | 53,7 | 11,3 | 21,1 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 99,3 | 96,2 | -3,1 | -3,2 | 97,3 | -1,1 | -1,2 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 34,1 | 33,5 | -0,5 | -1,6 | 33,6 | -0,1 | -0,4 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 31,9 | 31,0 | -0,9 | -2,7 | 30,5 | 0,5 | 1,6 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 4,8 | 4,8 | -0,1 | -1,2 | 5,1 | -0,4 | -7,4 |
| Almennar og privatar tænastur, kirkjur og samkomur v. m. | 58,3 | 57,2 | -1,1 | -1,9 | 58,8 | -1,6 | -2,8 |
| Gøtuljós | 9,7 | 9,1 | -0,5 | -5,2 | 9,0 | 0,2 | 1,8 |
| Sethús, íbúðir, summarhús, neyst, hitapumpur og el-bilar | 124,1 | 122,3 | -1,7 | -1,4 | 131,6 | -9,3 | -7,1 |
| **Tilsamans** | **409,9** | **419,2** | **9,3** | **2,3** | **419,8** | **-0,6** | **-0,1** |

íbindingargjøldini sum eru lægri enn ætlað, oljuútreiðslurnar sum eru hægri enn ætlað, avskrivingarnar, sum eru hægri enn ætlað, og roknaði skatturin fyri árið.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá felagnum

Rakstrarúrslitið eftir skatt fyri 2018 var eitt yvirskot upp á 38,1 mió. kr. móti einum yvirskoti upp á 89,0 mió. kr. í 2017. Tann av eykaaðalfundinum 24. november 2017 samtykta fíggjarætlanin fyri 2018 vísir eitt yvirskot upp á 79,5 mió. kr.

SEV lækkaði kWt-prísin fyri allar brúkarar í 2018 uttan fyri kundar felagsins í serligu prísssskránni og við eini nýtslu størri enn 30.000 kWt. Í 2017 lækkaði SEV kWt-prísin fyri allar brúkarar við 0,05 kr. pr. kWt. Tey føstu gjøldini eru óbroytt.

Niðanfyri standandi talva 3 vísir gongdina í prísbroytingum seinastu árini.

Tað er neyðugt at hava eitt munagott yvirskot soleiðis, at rakstur felagsins kann geva eina munagóða sjálvsfígging til íløgurnar, sum verða gjørdar og sum standa fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at umganga, at skuldin hjá felagnum gerst ov stór, ella at felagið ikki megnar at fáa til vega lán við nøktandi treytum. Somuleiðis skal inntøkan frá rakstrinum vera á einum slíkum støði, at felagið er ført fyri at halda sínar skyldur, sjálvt um afturgongd verður.

Fyri at røkka málinum um at hava eitt munagott yvirskot, metir SEV loypandi um tørvin at javna elprísin, eftirmetir raksturin og metir um íløgurnar, sum eru ætlaðar komandi ár. Umráðandi er, at fíggjargongdin hjá SEV er burðardygg, og at SEV hevur fíggjarliga styrki komandi árini, nú farið er undir stóru verkætlanina at víðka Sundsverkið fyri eina upphædd á góðar 700 mió. kr., samstundis sum felagið ger íløgur á øðrum økjum eisini. Í sambandi við, at íløgurnar stavandi frá visión 2030 verður gjørdar fyrri enn áður ætlað, verður helst neyðugt at hækka kravið uppá 25% eginfígging til komandi fíggjarætlan

SEV hevur sett sær sum langtíðarmál, at nettoskuldin í mun til EBITDA ikki skal verða størri enn 6,0 ferðir. Hetta støðið klárar felagið ikki at halda í løtuni, nú avlopið frá rakstrinum í 2018 er 38,1 mió. kr., og nettoskuldin í mun til EBITDA í 2018 er 6,2 ferðir. Felagið hevur tí tikið hædd fyri hesum og hækkað elprísin fyri 2019 við 0,10 kr. pr. kWt fyri allar kundar felagsins og ætlandi verður nettoskuldin í mun til EBITDA í 2019 6,0 ferðir soleiðis, at felagið aftur lúkur innanhýsis kravið til fíggjarliga lyklatalið. Kravið í mun til lániavtalur felagsins er 9,0 ferðir.

## Inntøkur

Tað eru tríggir tættir, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV. Hesir tríggir tættirnir eru elprísbroytingar, broytingar í elnýtsluni og forskjótingar í millum ymiskar kundaprísbólkar.

Talva 4 vísir nettoumsetning felagsins sundurgreinaðan seinastu 6 árini í mió. kr. Fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna eru í netroknskapinum hjá felagnum, sum eru á www.sev.fo.

Samlaðu inntøkur felagsins í 2018 vóru 429,9 mió. kr. móti 435,1 mió. kr. í 2017 svarandi til eina afturgongd upp á 5,2 mió. kr.

Inntøkur felagsins frá steymgjaldi og fasta gjaldinum í 2018 vóru tilsamans 419,2 mió. kr. mótvegis inntøkunum í 2017, sum vóru 409,9 mió. kr. Hesar gjørdust sostatt 9,3 mió. kr. hægri í 2018. Afturgongd var innan íbindingargjøld í 2018 grundað á forskjóting av inntøkum millum árini.

Sum talva 4 vísir, eru inntøkur felagsins hækkaðar frá 2012 fram til 2017, meðan ein lítil lækking er í 2018. Hetta kemur ikki einans av, at avroknaða elnýtslan hjá kundunum er vaksin, men eisini at prísurin er hækkaður í fleiri umførum seinastu árini fyri serliga at mótvirka hækkandi oljukostnaðinum hjá felagnum, sum verður brúktur í framleiðsluni.

Fasta gjaldið hevur verið sera javnt øll seinastu árini umleið 16-17 mió. kr. árliga. Hinvegin eru inntøkurnar fyri íbinding, ómaksgjøld og aðrar inntøkur svingandi frá ár til ár.

Talva 5 vísir úrslitið fyri hvønn seldan kWt í krónum seinastu árini.

Talva 6 vísir millum annað gongdina í avroknaðu søluni til kundar felagsins seinastu 6 árini í GWt. Talvan vísir, at sølan til kundar felagsins er støðugt økt ár undan ári. Eginnýtsla og nettap, har størsti parturin er nettap, er samsvarandi søluni eisini økt, samstundis sum forskjótingar eru í millum árini, sum stava frá forskjótingini av avlesingum av málarunum millum árini. Hesin trupulleiki er loystur, nú felagið hevur tikið talgildar fjaravlisnar málarar í nýtslu. Felagið arbeiðir áhaldandi við at minka um nettapið.

| Talva 3. Prísbroytingar | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísbroyting í vanligu prísskránni | -0,05 | -0,05 | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0,05 | 0,10 | 0,15 | 0,00 | 0,00 |
| Prísbroyting í serstøku prísskránni, nýtsla > 30.000 kWt | 0,00 | -0,05 | 0,00 | 0,00 | 0,05 | 0,11 | 0,10 | 0,15 | 0,00 | 0,00 |

| Talva 4. Nettoumsetningur í mió. kr. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Broyting í kr. í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KWt gjald | 362,4 | 379,2 | 385,0 | 392,7 | 393,1 | 402,2 | 9,1 | 2,3 |
| Fast gjald | 16,6 | 16,5 | 16,4 | 16,6 | 16,8 | 17,0 | 0,2 | 1,3 |
| Íbinding | 6,9 | 14,7 | 16,2 | 8,0 | 27,4 | 9,2 | -18,2 | -66,4 |
| Ómaksgjald v.m. | 1,3 | 2,7 | 6,7 | 5,3 | -2,2 | 1,4 | 3,6 | -164,5 |
| **Inntøkur** | **387,2** | **413,1** | **424,4** | **422,7** | **435,1** | **429,9** | **-5,3** | **-1,2** |
| Keyp av vindorku | -2,6 | -2,5 | -2,4 | -2,4 | -2,8 | -2,7 | 0,2 | -5,4 |
| **Nettoumsetningur** | **384,6** | **410,6** | **422,0** | **420,3** | **432,3** | **427,2** | **-5,1** | **-1,2** |

Framleiðslan úr vindi og vatni ávirkast við, at náttúran broytist frá ári til ár, og sum ávirkar bæði upp og niður. Miðal elframleiðslan við vatni er umleið 114 GWt árliga.

2013 var eitt serstakliga turt ár, sjálvt um tað regnaði illa frá miðjan november og fram til ársskiftið. Harumframt hevði Heygaverkið ikki fulla framleiðslu ein part av 2013 orsakað uppstíging av verkinum. Fossáverkið var fyri ein part av 2014 ikki í framleiðslu grundað á dagføring av stýrisskipanum til turbinurnar. Sjálvt um Fossáverkið ikki framleiddi elorku ein part av 2014, so eydnaðist tað í 2014 at framleiða munandi meiri elorku við vatnmegi, tí 2014 var eitt gott ár til elframleiðslu við vatni. Nógv avfall var fram til apríl mánaða, eins og nógv avfall var um heystið og veturin.

Gongdin við nógvum avfalli helt fram í 2015, har serliga nógv avfall var alt várið og fram til summarið. Frá summarinum og út á heystið var avfallið at rokna sum eitt vanligt miðalár, meðan um veturin var aftur nógv avfall. Stórt sæð alt 2016 var veðrið verið gott við lítið av vindi og lítlum avfalli. Hetta ávirkaði framleiðsluna av elmegi við vindi og vatni skeiva vegin. Elframleiðslan við vatni í 2017 var nakað minni enn ætlað, men nakað meiri enn í 2016. Hetta var grundað á viðlíkahald upp á vatnbyrgingarnar í Vestmanna tilhoyrandi Fossáverkið og vatnbyrgingina til Verkið á Strond. Samstundis var veðrið um várið og summarið gott, og hetta ávirkaði elframleiðsluna við vatni.

Avfallið fyrstu mánaðirnar í 2018 var minni enn í 2017 eins og nógv frost var fyrstu mánaðirnar í árinum, sum viðførdi frostbinding av vatninum, sum aftur ávirkaði elframleiðsluna burturúr vatni skeivan vegin. Minni vatn og frostbinding hava viðført, at SEV ikki hevur framleitt eins nógv el burturúr vatni, sum ætlað. Í 2018 hava dagføringar eisini verið á vatnturbinuni á verkinum norðuri á Strond í mai mánaða. Eingi onnur vatnorkuverk hava havt umvælingar ella dagføringar, og hava hesi tí framleitt orku alt árið, tó alt eftir hvussu nógv avfall hevur verið. Elframleiðslan burturúr vindi er tann stórsta, sum SEV higartil hevur havt, síðani byrjað varð at framleiða el við vindi.

Elframleiðslan við vatni í 2018 var 108,1 GWt móti 111,2 GWt í 2017, sum er 3,1 GWt lægri ella 2,8% lægri. Framleiðslan av elmegi við vatni svarar til, at 30,7% verða framleidd við vatnmegi.

Fyrst í januar í 2012 fórst tann fyrra Vestas myllan í Neshaga og í mars í 2012 tann seinna. Hetta ávirkaði framleiðsluna av elmegi við vindi munandi í 2012. Munandi framgongd er í framleiðsluni av elmegi við vindi í 2013, tí nýggju vindmyllurnar í Neshaga vóru í framleiðslu alt árið 2013. Í 2014 vaks framleiðslan við vindi munandi, tí nýggja vindmyllulundin í Húsahaga var tikin í nýtslu 9. oktober 2014. Framleiðslan vaks í 2014 við 12,7 GWt ella 58,3% í mun til 2013.

2015 var eitt gott vindár við nógvum vindi, meðan 2016 var eitt nøktandi ár fyri vindframleiðslu. Elframleiðslan við vindi í 2017 var betur enn í 2015, sum var eitt gott vindár. Framleiðslan við vindi í 2018 er tann besta higartil við 63,8 GWt mótvegis 59,7 GWt í 2017 ella 3,9 GWt hægri svarandi til 6,9%.

Framleiðslan av elmegi við vindi svarar til, at 18,1% verða framleidd við vindmegi.

| Talva 5. Úrslit fyri seldan kWt í krónum | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Broyting í kr. í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðalinntøka pr. seldan kWt | 1,41 | 1,46 | 1,47 | 1,45 | 1,42 | 1,34 | -0,08 | -5,5 |
| Miðalkostnaður pr. seldan kWt | 1,37 | 1,25 | 1,11 | 1,10 | 1,13 | 1,22 | 0,09 | 8,2 |
| Úrslit fyri seldan kWt | 0,04 | 0,21 | 0,37 | 0,35 | 0,29 | 0,12 | -0,17 | -59,1 |

| Talva 6. Avroknað søla í GWt. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Partur av fram-leiðslu í % | Broyting í GWt í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avroknað søla til kundar í GWt | 274,4 | 283,8 | 288,1 | 291,4 | 306,5 | 320,5 | 91,1 | 14,0 | 4,6 |
| Nettap og eginnýtsla í GWt | 18,1 | 21,6 | 26,3 | 25,9 | 27,8 | 31,5 | 8,9 | 3,6 | 13,1 |
| **Framleiðsla tils. í GWt pr. ár** | **292,5** | **305,4** | **314,4** | **317,4** | **334,3** | **352,0** | **100,0** | **17,7** | **5,3** |
| Herav við termisk | 180,1 | 150,2 | 125,5 | 158,9 | 163,4 | 180,1 | 51,2 | 16,7 | 10,2 |
| Herav við vatni | 90,6 | 120,7 | 133,1 | 106,3 | 111,2 | 108,1 | 30,7 | -3,2 | -2,8 |
| Herav við vindi | 21,8 | 34,5 | 55,8 | 52,1 | 59,7 | 63,8 | 18,1 | 4,1 | 6,9 |

Felagið væntar, at úrtøkan av framleiðsluni við vindi heldur sær á einum høgum støði grundað á battarískipanina í Húsahaga, eins og vindmyllulundin í Húsahaga hevur roynst væl síðani hon var tikin í nýtslu.

Fyri nærri sundurgreiningum av framleiðslu og býti v.m. verður víst til framleiðsluroknskapin hjá felagnum á www.sev.fo

## Útreiðslur

Talva 8 vísir gongdina í samlaðu útreiðslunum hjá felagnum síðani 2012 til 2018 í mió. kr. Talan er um eina hækking upp á 38,3 mió. kr. ella 11,1% í mun til undanfarna ár.

Í framleiðslu- og í netroknskapinum er kostnaðurin fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt umframt kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum umrøddur. Víst verður til hesir roknskapir á www.sev.fo.

## Oljuútreiðslur

Í oljuútreiðslunum er kostnaður til tungolju, gassolju og smyrjiolju, men parturin til tungoljuna er størstur. Av talvu 8 framgongur, at oljukostnaðurin er í vøkstri aftur, eftir at hann minkaði munandi í 2016 í mun til undanfarnu árini. Hesin var í 2016 komin niður á 50,9 mió. kr., sum var tað lægsta støði í mong ár, og er hesin í 2018 vaksin aftur til 105,8 mió. Kr. Oljuútreiðslurnar svara til 27,6% av samlaða kostnaðinum fyri 2018. Felagið brúkti 35.976 tons av tungolju í 2018 móti 32.631 tonsum í 2017, ella 3.345 tons fleiri í 2018 grundað á vøkstur í framleiðsluni av elmegi.

Hesin kostnaður er beinleiðis tengdur at prísbroytingum á heimsmarknaðinum umframt elnýtslubroytingini og sveiggjunum í framleiðsluni av elmegi við vindi og vatni.

Fyri nærri sundurgreining av oljukostnaðinum og prísi v.m. verður víst til framleiðsluroknskapin hjá felagnum á www.sev.fo.

## Tilfar og tænastuveitingar

Talva 9 vísir gongdina í samlaðu útreiðslunum til tilfar og tænastuveitingar frá 2013 til 2018 í mió. kr.

Útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar 2018 vóru 50,4 mió. kr. móti 53,9 mió. kr. í 2017 svarandi til eina lægri nýtslu upp á 3,5 mió. kr.

## Lønarútreiðslur

Talva 10 vísir gongdina í samlaðu lønarútreiðslunum frá 2013 til 2018 í mió. kr. Lønarútreiðslurnar fyri 2018 gjørdust 74,2 mió. kr. móti 67,4 mió. kr., ella ein hægri kostnaður uppá 6,8 mió. kr. Høvuðsorsøkin er hækkandi sáttmálalønir, økt starvsfólkatal og at SEV hevur hækkað avsetingina til feriuløn v.m. við 4,0 mió. kr. SEV fylgir teimum almennu sáttmálunum, sum eru galdandi á teimum ymisku økjunum.

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið vóru 36,7 mió. kr. í 2018 móti 33,9 mió. kr. í 2017 ella ein hægri lønarútreiðsla upp á 2,8 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar til netvirksemið hava verið á sama støði seinastu árini. Lønarútreiðslan fyri netvirksemið í 2018 var 23,5 mió. kr. móti 21,0 mió. kr. í 2017 ella ein hægri nýtsla upp á 2,5 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar til fyrisitingina hava verið støðugt vaksandi tey seinastu árini, har tær í 2018 eru 14,0 mió. kr. móti 12,4 mió. kr. í 2017, sum eru 1,6 mió. kr. hægri enn undanfarna ár.

## Fíggjarkostnaður

Felagið arbeiddi í 2016 við at umfíggja táverandi skuldina upp á 830 mió. kr. eins og at fáa fígging til vega til komandi íløgur, eitt nú útbyggingina av Støð 3 á Sundsverkinum, og 19. desember 2016 bleiv nýggja fíggingin avgreidd. Nýggja fíggingin er samansett við

| Talva 7. Tons tungolja | 2016 | 2017 | 2018 | 2018 Ætlan | Frávik millum ætlan og roknskap 2018 | Frávik millum roknskapin 2017 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tungolja | 32.195 | 32.631 | 35.976 | 35.300 | 676 | 3.345 |

| Talva 8. Gongdin í útreiðslum í mió. kr. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Broyting í kr. í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 | Kostnaður í 2018 í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Olja | 167,9 | 141,5 | 86,2 | 50,9 | 84,7 | 105,8 | 21,0 | 24,8 | 27,6 |
| Orkukeyp | 2,6 | 2,5 | 2,4 | 2,4 | 2,8 | 2,7 | -0,2 | -5,4 | 0,7 |
| Tilfar og tænastuveitingar | 54,1 | 49,8 | 49,9 | 59,3 | 53,9 | 50,4 | -3,5 | -6,5 | 13,2 |
| Lønir | 58,7 | 63,6 | 64,3 | 66,5 | 67,4 | 74,2 | 6,8 | 10,1 | 19,4 |
| Avskrivingar | 70,0 | 77,2 | 93,6 | 93,2 | 102,7 | 115,1 | 12,4 | 12,1 | 30,1 |
| Rentur | 22,0 | 20,6 | 24,8 | 48,3 | 32,9 | 34,6 | 1,7 | 5,1 | 9,0 |
| **Tilsamans** | **375,4** | **355,3** | **321,3** | **320,6** | **344,6** | **382,8** | **38,3** | **11,1** | **100,0** |

fígging frá lánsbrøvum fyri 1.042 mió. kr. og bankafígging, sum ein trekningsrættur upp á 626 mió. kr., sum við árslok 2018 er trektur við 306 mió. kr. Samlaða fíggingin sum SEV fekk til vega í desember 2016, var upp á 1.668 mió. kr.

Bruttoskuldin við árslok 2018 er 1.343 mió. kr. móti 1.133 mió. kr. ella 210 mió. kr. hægri. Rentukostnaðurin við árslok 2018 er 30,9 mió. kr. móti 28,4 mió. kr. í 2017. Eisini hevur felagið rentutryggingaravtalur fyri at avdekka rentuváðan og avtalur fyri at avdekka gjaldoyraváðan, og í hesum sambandi er ein ikki staðfest javning av hesum avtalunum bókaður við -7,4 mió. kr. Hesar skyldur broytast alt eftir gongdini í rentustøðinum. Harumframt er kursjavningarinntøka fyri 8,9 mió. kr.

Rentuútreiðslurnar netto v.m. vóru 34,6 mió. kr. í 2018 móti 32,9 mió. kr. í 2017 svarandi til eina hægri útreiðslu upp á 1,7 mió. kr. Í 2018 og 2017 er innroknað broytingin í javningini av fíggjarligu amboðunum.

Í løtuni hevur samlaða bruttoskuldin eina fasta rentu stavandi frá lánsbrøvum við fastari rentu, eins og ein partur av skuldini er avdekkaður við rentutryggingaravtalu fyri rentuna.

## Avskrivingar

Avskrivingarnar fyri 2018 vóru 115,1 mió. kr. móti 102,7 mió. kr. í 2017 svarandi til, at hesar gjørdust 12,4 mió. kr. hægri. Hetta merkir, at avskrivingarnar er størsti útreiðsluposturin svarandi til 30,1% av samlaða kostnaðinum. Áður var tað oljukostnaðurin, sum var størsti útreiðsluposturin. Henda broyting er íkomin grundað á stóru íløgurnar felagið hevur gjørt seinastu árini. Oljukostnaðurin er tó vaksandi og er hesin á einum høgum støði.

## Váðaviðurskifti

Váðar hjá felagnum kunnu sundurgreinast í ymiskar bólkar.

## Marknaðarváðar

SEV hevur serliga seinastu fýra árini gjørt stórar íløgur í framleiðslueindir og net, og SEV skal framhaldandi gera stórar íløgur eitt nú í víðkanini av Sundsverkinum, væntandi fyri eina upphædd á góðar 700 mió. kr. Grundað á allar íløgurnar sum SEV hevur gjørt, og er í ferð við at gera, kann sigast, at SEV í ein ávísan mun eisini er eitt verkætlanarfelag, har tað er neyðugt at hugsa langskygt og leggja fíggjarætlanir, sum samsvara hesum. Hetta viðførir, at tað er umráðandi at kenna týdningarmiklu kostnaðirnar, eitt nú oljukostnaðin, gjaldoyrakostnaðir og rentukostnaðir.

Møguleikin hjá SEV at heinta øktan kostnað inn í gjøgnum elprísin ella onnur gjøld, partvíst ella heilt, er avmarkaður og møguleikin at hava undirskot ella ikki nøktandi úrslit av rakstrinum, letur seg bara gera í eitt ávíst tíðarskeið. Prísstøðið er í síðsta enda eitt mál fyri eigararnar hjá SEV og harvið politiskt tengt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum, meðan fígging av øktum kostnaði umvegis gjaldføri frá fígging letur seg bara gera í eitt styttri tíðarskeið og

| Talva 9. Samlaðar útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar í mió. kr. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Broyting í kr. í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | 24,1 | 21,1 | 21,3 | 28,2 | 25,0 | 22,4 | -2,7 | -10,7 |
| Net | 15,4 | 11,9 | 11,8 | 12,4 | 10,4 | 9,9 | -0,5 | -4,6 |
| Fyrisiting | 14,6 | 16,8 | 16,8 | 18,6 | 18,5 | 18,1 | -0,3 | -1,9 |
| **Tilsamans** | **54,1** | **49,8** | **49,9** | **59,3** | **53,9** | **50,4** | **-3,5** | **-6,5** |

| Talva 10. Gongdin í lønarútreiðslum í mió. kr. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Broyting í kr. í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | 30,7 | 30,9 | 32,0 | 33,7 | 33,9 | 36,7 | 2,8 | 8,3 |
| Net | 19,5 | 19,9 | 21,1 | 20,7 | 21,0 | 23,5 | 2,5 | 11,7 |
| Fyrisiting | 10,5 | 11,7 | 11,9 | 12,4 | 13,8 | 14,3 | 1,8 | 14,8 |
| *Javning tænastumannaeftirlønarskylda* | *-1,9* | *1,1* | *-0,7* | *-0,2* | *-1,4* | *-0,3* | *1,1* | |
| **Tilsamans** | **58,7** | **63,6** | **64,3** | **66,5** | **67,4** | **74,2** | **6,8** | **10,1** |

avmarkar møguleikarnar fyri ætlaðum íløgum, tá ið fíggjarliga orkan fer til at fíggja øktan kostnað.

Í sambandi við lántøku hyggja fíggjarstovnar eftir roknskaparligu lyklatølunum fyri týdningarmiklastu økini, og kravið til hesi lyklatøl er eitt nú støðufesti. Fyri at fáa kappingarføra fígging til vega er neyðugt at møta ella lúka krøvunum frá fíggjarveitarum um at avdekka týdningarmiklastu váðarnar mótvegis vaksandi kostnaði. SEV er ein áhugaverdur kundi at veita fígging til, og kann sambært ráðgevum tess skrásetast sum ein "investment grade" kundi. Hetta gevur møguleika fyri einari góðari fígging upp á fleiri mátar. Skal SEV framhaldandi fáa góða fígging til vega, er neyðugt at halda hetta "ratingstøði". Tá er neyðugt at hava ein støðugan rakstur við einum nøktandi avkasti, sum ger, at roknskaparligu lyklatølini vera á hædd við lyklatølini hjá feløgunum, sum SEV kappast við um fíggingingar.

SEV hevur saman við SEB, sum er ráðgevari hjá SEV innan fíggjarøkið og váðaøkið (prístryggingarøkið), arbeitt við eini ætlan at avdekka váðan í sambandi við olju- og gjaldoyrakeyp eins og rentu. Í hesum sambandi hevur felagið gjørt eina "prístryggingarstrategi" (hedgingstrategi) fyri olju, gjaldoyra og rentu. Prístryggingarstrategi'in er eisini partur av lánsavtalunum, sum felagið fekk til vega í desember 2016.

## Rentuváði

SEV hevur sum strategi at tryggja upp til 100% av skuldini við eini gildistíð longri enn 12 mánaðir til eina fasta rentu. Somuleiðis skal miðalgildistíðin av fastløstu rentuni vera millum 5 og 10 ár. Hetta verður gjørt á tann hátt, at SEV kann arbeiða við avdekkningum av rentuváðanum innanfyri eitt spenn millum 80 og 100% av skuldini til eina og hvørja tíð. Skuldin kann hava eina avtalaða fasta rentu ella eina broytiliga rentu, sum verður avdekkað við eini avtalu um umbýting av broytiligari rentu til fasta rentu (rentu-umbýtingaravtalu/rentuswap).

Hesin háttur krevur, at fastrentuskuldin skal viðlíkahaldast soleiðis at skilja, at tá ið fastrentuparturin antin fellur undir 80% ella økist til yvir 100%, skulu tillagingar gerast í rentu-umbýtingar-avtalunum (rentuswapsavtalunum). Hetta viðførir, at ávísar rentuumbýtingaravtalur skulu lokast fyri til dømis at umganga, at ein størri partur enn 100% er rentutryggjaður. Hetta viðførir aftur, at virðið av rentuumbýtingaravtaluni skal gerast upp. Eitt jaligt virði lækkar fíggjartørvin hjá SEV, meðan eitt neiligt virði økir fíggjartørvin. Javningin av rentutryggingaravtalunum skal í høvuðsheitum bókast yvir eginogn felagsins. SEV fer at stremba eftir, at hava eina javna samanseting av rentutryggingaravtalum yvir tíð, har málið er at hava eina miðal fasta rentu millum 5 til 10 ár.

| Marknaðarváði | Kreditt- og mótpartsváði | Rakstrarligir váðar | Strategiskir og aðrir váðar |
|---|---|---|---|
| Rentuváði | Áogn hjá kundum | Veitingartrygd | Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipa tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. |
| Oljuprísváði | Innistandandi hjá bankum | Kunningartøkni (KT) | |
| Gjaldoyraváði | Lánsbrøv | Feilir í innanhýsis manna-gongdum | |
| Gjaldførisváði | Tryggingar | Feilir av mannaávum | Nýggj tøkni (disruption) |
| | | Heilsa, trygd og umhvørvi | Verkætlanir |
| | | | Vitanarstøði og menning |

SEV hevur í sambandi við nýggju lántøkuna tryggjað sær eina fasta rentu upp á alla sína bruttoskuld við árslok 2017 upp á 1.042 mió. kr. frá lánsbrævafíggingini við eini miðal gildistíð upp á umleið 8,3 ár. Harumframt hevur felagið í desember 2016 gjørt rentuumbýtingaravtalu fyri skuldina, sum ætlandi íkemur, tá felagið ger brúk av bankafíggingini, so hvørt íløgur verða framdar. Hetta er samsvarandi strategi fyri trygging av rentuváða. Sostatt fer ein øking í rentustøðinum generelt ikki at ávirka størsta partin av kostnaðinum fyri skuldina komandi 8 árini.

## Oljuprísváði og gjaldoyrisváði

Ein avleiðing av íløguætlanini komandi árini er, at prístryggingarstrategiin fyri olju og gjaldoyra er víðkað til at fevna um 4 ár aftrat inniverandi ári. Hetta er sama tíðarskeið, tá ið lántøkan hjá felagnum væntast at hækka við umleið 600 mió. kr. til umleið 1.600 mió. kr.

SEV hevur avdekkað oljuprísváðan eftir niðanfyri standandi leisti.

| | Ár 1 | Ár 2 | Ár 3 | Ár 4 | Ár 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| Oljuprístrygging | 80% | 60% | 40% | 20% | 20% |

Hetta viðførir, at tryggingardekkningurin verður stovnaður ár eitt fyri einstøku rakstrarárini. Í ár tvey verður hesin tryggingardekkningur so øktur fyri aftur at endurgeva ein avdekkning upp á 5 ár. Hesin leistur tryggjar eina stigvísa stovnan av tryggingini á einum støði, sum endurgevur eina miðal prísgongd av teimum ymisku árunum. SEV hevur avdekkað váðan við eini fastprístrygging.

Samstundis sum tryggingardekkningurin fyri prísin upp á oljuna er gjørdur, eru teir dollarar, sum skulu nýtast til oljukeypið eisini keyptir upp á termin, fyri harvið at avdekka gjaldoyrisváðan í dollarum.

Við einum hækkandi oljuprísi og hækkandi dollarkursi fer ein slík avdekkan av oljuprísváðanum og gjaldoyraváðanum at hava eina tálmandi ávirkan á kostnaðin, og rakstrarúrslitið gerst meiri støðugt.

## Gjaldførisváði

SEV hevur sum mannagongd, at áðrenn farið verður í gongd við einstakar verkætlanir, skal fígging til hesar fyriliggja, áðrenn byrjað verður. Við hesum er fígging altíð tøk til verkætlanirnar.

Harumframt skal felagið altíð í minsta lagi hava umleið 100 mió. kr. innistandandi í peningastovnum at taka til, um tað gerst neyðugt. Í sambandi við rakstur er felagið við hesum 100 mió. kr. ført fyri at svara hvørjum sítt teir næstu umleið 3-6 mánaðirnar, uttan at felagið hevur nakrar inntøkur. Harumframt er ynskiligt, at hava atgongd til kassakredittir, sum stuðla undir gjaldførinum um neyðugt.

## Kreditt- og mótpartsváðar
## Áogn hjá kundum

Felagið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum. Felagið hevur eina fasta mannagongd fyri, hvussu fylgt verður upp á útistandandi hjá kundum felagsins. Verður ikki rindað til tíðina, fær kundin sendandi áminningar, og hevur kundin ikki rindað innan ávísa tíð, eftir at triðja áminningin er send kundanum, verður elveitingin til kundan slitin. Henda mannagongd avmarkar váðan mótvegis kundum felagsins, tó at felagið kann hava avmarkaðan váða av einstøkum størri kundum.

## Innistandandi hjá peningastovnum

Ansað verður støðugt eftir at býta innistandandi hjá felagnum millum fleiri peningarstovnar, sum hava ávísa búskarparliga styrkju, fyri harvið at avmarka váðan.

## Lánsbrøv

Sum ein møguleika til innistandandi hjá peningastovnum kann felagið keypa donsk stats- ella realkredittlánsbrøv. Fyri at avmarka kursváðan í hesum sambandi verður dentur lagdur á lánsbrøv við stuttari lánitíð.

## Tryggingar

SEV hevur saman við ráðgevara tess innan tryggingar Sp/f Íti v/Ali Celebi (fyrr Willis Føroyar) arbeitt við avdekkan av tryggingarváðum soleiðis, at miðað verður eftir, at eingin einstakur skaði og samanlegging av skaðum ikki skal ávirka rakstrarúrslitið hjá SEV við meiri enn 10 mió. kr.

## Rakstrarligir váðar

Ásannast má, at tað ikki heilt slepst undan rakstrarligum váðum, men hesir váðar kunnu avmarkast til eitt nærri ásett støði, sum kann góðtakast við átøkum, mannagongdum og eftirlitum, sum nevnd og leiðsla seta út í kortið.

## Veitingartrygd

Endamálið við elveitingarlógini er millum annað at tryggja, at elveitingin í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti at veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi. Prísurin fyri elmegina skal ikki verða hægri enn neyðugt við fyriliti fyri veitingartrygd, umhvørvi og øðrum tænastum/skyldum, sum SEV hevur mótvegis brúkarunum. SEV skal altíð hava ein tryggan og effektivan rakstur, sum røkkur ásettum málum fyri veitingartrygd. Felagið arbeiðir framhaldandi við at menna veitingartrygdina og góðskuna av elmegini.

Eisini í sambandi við veitingartrygdina er neyðugt at taka atlit at illveðri og øðrum hendingum. Her hevur SEV seinastu mongu árini arbeitt við at kaðalleggja linjur soleiðis, at vandin fyri neiligari ávirkan á hesum økinum er minkaður.

## KT og innanhýsis mannagongdir

Váðalækkandi virksemi kann verða KTtrygdarpolitikkur og leiðreglur o.a. innan KT. Politikkir fyri mannagongdir, eftirlit og funktiónsskilnað. Eisini er framhaldandi útbúgving og menning av starvsfólkum umráðandi í hesum sambandi.

## Heilsa og trygd

Felagið leggur stóran dent á heilsu og trygd. Tilgongdin er ein nullhugsjón, har eingin skal koma til skaða undir arbeiðnum hjá og fyri SEV, eins og SEV ikki skal skaða onnur í sambandi við sítt virksemi. Í hesum sambandi hevur felagið neyvt ásettar politikkir og mannagongdir á økinum.

## Umhvørvið

SEV nýtir tungolju og gassolju í framleiðsluni av elmegi, eins og felagið nýtir fleiri vandamikil evni til reingerð og annað í sambandi við motorarnar. Á umhvørvisøkinum verður stórur dentur lagdur á at fara væl um umhvørvið, og at reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd. Her kann nevnast, at SEV hevur ísett framkomna roykreinsiútgerð á nýggjastu moturunum í Vági og á Sundi.

## Strategiskir váðar

Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipað tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. Strategiski váðin skal avmarkast við eini munagóðari virkisætlan. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur, so sum vatn, vind og sjóvarfall harumframt nýggju stýriskipanin frá Schneider Electric og smartgrid-loysnum. Fyri at felagið framhaldandi skal hava gott orð á sær, verður áherðsla løgd á opinleika um virksemið og viðurskifti tess.

## Nýggj tøkni

Nýggj tøkni (disruption) ger seg galdandi alla tíðina, og fylgir SEV væl við teimum møguleikum og hóttanum, sum eru knýttir at hesum.

## Verkætlanir

SEV mennir alla tíðina framleiðslu- og netpartin, og í hesum sambandi verða nógvar verkætlanir framdar. Í hesum sambandi er neyðugt við neyvari stýring, og fyri at stýra størri verkætlanum verða bygginevndir stovnsettar, eins og verkætlanarleiðarar verða knýttir at einstøku verkætlanunum.

## Vitanarstøði og menning

Útbúgving og menning av starvsfólkum eru lyklaorð í at menna felagið og harvið at avmarka strategiskar váðar. Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Harumframt hevur SEV áhaldandi leiðaraútbúgvingar til leiðararnar fyri betur at stuðla teimum í arbeiðinum hjá SEV.

## Íløgur

Nú árið er runnið, kann staðfestast, at íløgurnar vóru 436,0 mió. kr. í 2018 móti 388,5 mió. kr. í 2017, sum eru 47,5 mió. kr. meiri enn undanfarna ár. Í talvu 11 eru íløgurnar sundurgreinaðar í mió. kr. Sambært fíggjarætlanini fyri 2018 var roknað við íløgum fyri tilsamans 554,7 mió. kr. svarandi til eina minni íløgu enn ætlað uppá 118,7 mió. kr.

Talvan vísir upprunaætlanina fyri íløgur upp á 554,7 mió. kr. Umraðfestingar upp á 1,1 mió. kr. eru gjørdar innan verandi samtyktu karmar fyri íløgur upp á 554,7 mió. kr. í 2018. Eisini framgongur íløguætlanin eftir umraðfestingina, sum verður samanborin við roknskapin 2018.

Í mun til fíggjarætlanina 2018 aftan á umraðfestingar eru nettoíløgurnar 436,0 mió. kr., og hetta er 118,7 mió. kr. minni enn ætlað. Hetta stavar frá, sum talva 11 vísir, lægri íløgur upp á 107,2 mió. kr. í framleiðsluna, 6,6 mió. kr lægri íløgur í netvirksemið og 4,9 mió. kr. lægri íløgur í fyrisitingina. Innan framleiðsluna er tað serliga lægri íløgur í Sundsverkið enn ætlað. Somuleiðis eru lægri íløgur í koplingarstøðir og fyrisitingarbygning enn ætlað.

Íløgan í Fossáverkið er 0,4 mió. kr. meðan íløgan í Heygaverkið er 0,1 mió. kr. Íløgur í Mýruverkið eru 1,8 mió. kr., har millum annað 1,0 mió. kr. stava frá at asfaltera vegin niðan á Mýrarnar. Aðrar íløgur eru fyri 0,8 mió. kr.

Íløgan í Eiðisverkið er 2,6 mió. kr., har 1,8 mió. kr. eru til at asfaltera vegin til sunnaru byrgingina. Aðrar íløgur eru fyri 0,8 mió. kr.

Íløgan í Elverkið í Botni er 4,7 mió. kr., har 3,7 mió. kr. eru til pumpuskipan í Botni. Aðrar íløgur eru fyri 1,0 mió. kr.

Íløgan í Vágsverkið er 6,7 mió. kr., og stava 1,4 mió. kr. í nýggja Scadaskipan (stýriskipan av verkinum) og 0,9 mió. kr. er liðugtgerð í sambandi við nýgerð av M4. Nýggj vaktstova er gjørd fyri 0,5 mió. kr. og 1,0 mió. kr. eru brúktar til eykalutir á goymslu til M4. Eisini er sløkkiútgerð keypt fyri 0,6 mió. kr. Aðrar íløgur eru fyri 2,3 mió. kr.

Samlaða íløgan í Sundsverkið í 2018 er 255,3 mió. kr., men hon er minni enn ætlað. Íløgan í Støð 3 í 2018 er 226,6 mió. kr., sum kann sundurgreinast soleiðis: 81,3 mió. kr. til motorar, 15,9 mió. kr. til projektering og ráðgeving, 82,3 mió. kr. til bygningar og 46,9 mió. kr. til annað.

| Talva 11. Íløgur í mió. kr. | Upprunaætlan 2018 fyri íløgur | Umraðfesting av íløgum 2018 | Ætlan eftir umraðfesting | Íløgur sambært roknskap 2018 | Frávik í mun til roknskap og javnað ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3=1+2 | 4 | 5=3-4 |
| Fossáverkið | 2,6 | 0,0 | 2,6 | 0,4 | -2,2 |
| Heygaverkið | 0,8 | 0,0 | 0,8 | 0,1 | -0,7 |
| Mýruverkið | 4,5 | 0,0 | 4,5 | 1,8 | -2,6 |
| Eiðisverkið | 6,1 | 0,3 | 6,3 | 2,6 | -3,7 |
| Verkið í Botni | 9,4 | 0,0 | 9,4 | 4,7 | -4,7 |
| Vágsverkið | 7,5 | 0,0 | 7,5 | 6,7 | -0,8 |
| Sundsverkið | 325,1 | 0,5 | 325,6 | 255,3 | -70,3 |
| Verkið á Strond | 9,1 | 0,0 | 9,1 | 5,4 | -3,7 |
| Smærri verk | 18,3 | 0,3 | 18,6 | 2,9 | -15,8 |
| Vindmyllur í Suðuroy | 5,0 | 0,0 | 5,0 | 2,2 | -2,8 |
| **Íløgur í framleiðsluvirkir tilsamans** | **388,3** | **1,1** | **389,4** | **282,2** | **-107,2** |
| Koplingarstøðir og net v.m. | 146,4 | -1,1 | 145,3 | 138,6 | -6,6 |
| Fyrisitingarbygningar, amboð, KT-útgerð | 20,0 | 0,0 | 20,0 | 15,1 | -4,9 |
| **Tilsamans** | **554,7** | **0,0** | **554,7** | **436,0** | **-118,7** |

Nýggjur tangagarður og nýtt dagtangahús hevur verið í gerð síðani 2012. Verkætlanin er nú liðug og húsið bleiv formliga tikið í nýtslu 8. november 2018. Í 2018 eru íløgur fyri 25,0 mió. kr. gjørdar í verkætlanina. Samlaði kostnaðurin fyri tangagarðin, bygningin, tangar, tekniska útgerð og elarbeiðið er uppgjørdur til 143,4 mió. kr. sum er 6,0 mió. kr. hægri enn ætlað. SEV metur seg hava fingið væl burturúr verkætlanini og meirkostnaðinum.

Íløgan í verkið á Strond er 5,4 mió. kr., har 2,7 mió. kr. er til uppstígan av vatnturbinu, 0,7 mió. kr. til byrgingina í Strandadali Aðrar íløgur eru fyri 2,0 mió. kr.

Íløgur í koplingarstøðir og net eru fyri tilsamans 138,6 mió. kr. Íløgur í koplingarstøðir eru 76,2 mió. kr., meðan íløgur í net v.m. eru 54,9 mió. kr. Íløgur í fjarskiftismálarar, verkfrøði og teknikk eru 8,2 mió. kr. Íløgan í fjarskiftismálararnar v.m. er 1,1 mió. kr. og 5,2 mió. kr. í nýggja stýrisskipan. Aðrar íløgur eru fyri 1,9 mió. kr.

Av íløgunum til koplingarstøðir er íløgan í koplingarstøðina innan Eið 5,6 mió. kr., í koblingarstøðina í Vestmanna 6,7 mió. kr., í koplingarstøðina á Strond 24,1 mió. kr., koplingarstøðina á Tvøroyri 6,7, og í koplingarstøðina á Sundi (Støð 3) 28,9 mió. kr. Aðrar íløgur í koplingarstøðir eru 4,2 mió. kr.

Av teimum 54,9 mió. kr. sum eru íløgur í net, kunnu sundurgreinast í íløgur fyri 13,4 mió. kr. í net í Norðoyggjum, 10,5 mió. kr. í Eysturoy, 3,3 mió. kr. í Vágoy, í Miðstreymoy 1,3 mió. kr. 11,4 mió. kr. í Suðurstreymoy, 1,2 mió. kr í Sandoy og 7,7 mió. kr. í Suðuroy. Harumframt annað fyri net 6,0 mió. kr.

Íløgur í fyrisitingarbygningar, amboð, KT-útbúnað v.m. eru munandi lægri enn ætlað, serliga tí at dagføringin av fyrisitingarbygninginum við Landavegin er seinkað. Íløgur eru gjørdar fyri 15,2 mió. kr., sum eru fyri keyp av lonum til skrivstovur og P-pláss, neyðstreymsgenerator 0,6 mió. kr. KT-útgerð, skráir og annað eru fyri 4,2 mió. kr. Innrætting á Oyrunum í Vági er gjørd fyri 0,5 mió. kr.

Talva 12 vísir samlaðu bruttoíløgurnar hjá SEV frá 2009 til 2018 í mió. kr.

Síðani 2008 og fram til dagin í dag hevur SEV gjørt íløgur fyri 2.244 mió. kr. svarandi til 204 mió. kr. um árið seinastu 11 árini.

Talvur 13-15 vísa gongdina í íløgum, arbeiði í gerð og tilgongd til støðisogn í 2018 og 2017.

Av talvu 14 framgongur, at í 2018 eru íløgur fyri 420,9 mió. kr. móti 369,7 mió. kr. í 2017 bókaðar sum arbeiði í gerð í árinum, meðan 256,8 mió. kr. í 2018 móti 90,4 mió. kr. í 2017 av arbeiðinum í gerð við ársenda er flutt yvir til avskrivingargrundarlagið sum tilgongd til støðisogn.

Av salduni við ársenda upp á 682,1 mió. kr. í 2018 móti 518,1 mió. kr. í 2017 er framleiðsluparturin 514,2 mió. kr., og netparturin er 167,9 mió. kr. Av framleiðslupartinum upp á 514,2 mió. kr. eru 5,0 mió. kr. til verkið í Botni, 6,7 mió. kr. til Vágsverkið, 484,2 mió. kr. til Sundsverkið, 5,0 mió. kr. til verkið á Strond og 13,3 mió. kr. til annað.

| Talva 12. Íløgur í mió. kr. | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vatnorkuverk | 27,4 | 41,7 | 62,8 | 82,0 | 58,5 | 72,4 | 29,4 | 13,4 | 8,5 | 17,2 | 15,1 |
| Onnur elorkuverk | 20,2 | 13,4 | 3,3 | 0,8 | 60,0 | 34,7 | 149,5 | 108,3 | 135,4 | 250,5 | 266,4 |
| Býtisvirkir | 41,1 | 19,6 | 21,7 | 9,1 | 31,2 | 43,8 | 88,1 | 95,9 | 86,7 | 109,4 | 143,5 |
| Onnur rakstrargøgn | 3,1 | 5,6 | 5,7 | 3,9 | 3,1 | 4,1 | 8,2 | 14,5 | 11,2 | 11,3 | 11,0 |
| **Tilsamans** | **91,8** | **80,3** | **93,5** | **95,8** | **153,8** | **155,0** | **275,2** | **232,1** | **241,7** | **388,5** | **436,0** |

Fyri netpartin upp á 167,9 mió. kr. eru koplingarstøðir 46,6 mió. kr., net 86,8 mió. kr. og stýrisskipanir v.m. 34,6 mió. kr. Samanumtikið kann sigast, at arbeiðið í gerð er økt við 164,0 mió. kr. í 2018 móti eini øking upp á 279,4 mió. kr. í 2017.

Av talvu 15 tilgongd til støðisogn framgongur, at í 2018 eru 271,9 mió. kr. móti 111,5 mió. kr. í 2017 fluttar til tilgongd undir støðisogn.

Størstu einstøku verkætlanir, sum fluttar eru sum tilgongd frá arbeiði í gerð við ársenda 2018, eru tangahúsið á Sundi við 103,1 mió. kr. og koplingarstøðirnar Innan Eið og við Strond við ávíkavist 42,2 og 38,9 mió. kr.

Víst verður eisini til arbeiði í gerð og til notu 7 í roknskapinum.

## Gjaldførið

Felagið hevur í 2018 økt um lániskuldina við 200 mió. kr. móti 106,0 mió. kr. í 2017, har felagið hevði tøkan pening frá umfíggingini í 2016 til at gera íløgur fyri. Í fíggjarætlanini fyri 2018 var ætlað við eini lántøku upp á 350 mió. kr.

| Talva 13. Íløgur tilsamans í mió. kr. | 2017 | 2018 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 369,7 | 420,9 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | 18,8 | 15,1 |
| **Íløgur við ársenda** | **388,5** | **436,0** |

| Talva 14. Arbeiði í gerð í mió. kr. | 2017 | 2018 |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 238,8 | 518,1 |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 369,7 | 420,9 |
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | -90,4 | -256,8 |
| **Salda við ársenda** | **518,1** | **682,1** |
| Broyting í arbeiði í gerð | 279,4 | 164,0 |

Gjaldførisbroyting felagsins frá rakstrinum var 178,7 mió. kr. 2018 móti 194,9 mió. kr. í 2017. Sostatt var sjálvfíggingin til íløgur og avdráttir positiv. Lániavtalan við fíggjarveitarnar, sum felagið gjørdi í desember 2016 ásetur, at eingin avdráttur skal rindast, men at skuldin skal rindast aftur í einum, tá ið áramálið fyri fíggingina er av.

Gjaldføri felagsins við ársenda 2018 er 190,8, mió. kr. móti 248,0 mió. kr. í 2017. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 314,9 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 505,7 mió. kr. í 2018 móti 768,0 mió. kr. í 2017. Størsti parturin av óbrúktu trekningsrættunum skal brúkast til at fíggja íløgur komandi árini.

Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

## Útlit fyri rakstrarárið 2019

Síðani 2008 og fram til 2012 hevur felagið havt eitt samlað undirskot upp á 98,6 mió. kr. Hesin peningur er umvegis ov lágum elprísum latin elbrúkarunum. Í 2013 fekk felagið eitt yvirskot eftir skatt upp á 11,9 mió. kr., so sigast kann, at neiliga gongdin í rakstrinum er vend í 2013, og henda jaliga gongd hevur hildið áfram seinastu fimm árini, har úrslitið hevur verið yvirskot. Samanlagt síðani 2008 og fram til 2018 hevur felagið havt eitt samlað nettoyvirskot á 303 mió. kr. ella eitt yvirskot í miðal upp á 27,5 mió. kr. um árið.

| Talva 15. Tilgongd til støðisogn í mió. kr. | 2017 | 2018 |
|---|---|---|
| Arbeiði førd til avskrivingar sum tilgongd | 90,4 | 256,8 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn | 21,1 | 15,1 |
| **Tilgongd við ársenda** | **111,5** | **271,9** |

Ætlað verður við einum yvirskoti á 81,3 mió. kr. áðrenn skatt og 66,6 mió. kr. eftir skatt eftir at felagið hækkaði elprísin við 0,10 kr. pr. kWt fyri allar kundabólkar felagsins.

Upprunaliga er roknað við eini øking í elnýtsluni upp á 7,1% í miðal í 2019 í mun til staðfest 4,6% í 2018. Hendan øking stavar frá ætlaðum vøkstri í fleiri kundabólkum við ymiskum vakstrarratum. Talan er um eina øking í søluni av kWt.

Við støði í søluni fyri 2017 og partvíst í 2018 er ætlað við eini sølu í 2019 upp á 338,4 GWt ella 456,2 mió. kr. Fasta gjaldið verður stórt sæð óbroytt upp á 17,1 mió. kr. Harumframt koma inntøkur frá íbindingargjaldinum og annað upp á 12,0 mió. kr. soleiðis, at ætlað er við eini samlaðari inntøku upp á 485,3 mió. kr. í 2019 móti 429,9 mió. kr. í 2018. Hetta svarar til, at felagið fær eina meiri inntøku upp á 55,4 mió. kr. í mun til 2018.

Oljuútreiðslurnar eru í fíggjarætlan felagsins fyri 2019 mettar at verða 116,1 mió. kr. móti 105,8 mió. kr. í 2018. Felagið prístryggjaði í januar 2016 og 2017 part av sínum oljukeypi fyri 2019, eins og seinastu nøgdirnar av olju sum skulu brúkast í 2019 eru prístryggjaðar í februar og desember 2018 til ein lægri oljukostnaða enn ætlað, meðan prísurin fyri dollaran er fallin í mun til ætlanina soleiðis, at samlaða prístryggingin fyri nøgdirnar verður betur enn ætlað fyri 2019. Um ikki oljunøgdirnar økjast munandi í mun til ætlað verður mett, at oljuútreiðslunar verða lægri enn ætlað, tó skal hædd takast fyri javning av oljugoymslum til marknaðarvirði.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 130,7 mió. kr. í 2019 móti 126,0 mió. kr. í 2017 svarandi til eina hægri útreiðslu upp á 4,7 mió. kr. ella 3,7%.

Ætlað er við 235,9 mió. kr. í úrsliti av vanligum rakstri í 2019. Ætlað er við avskrivingum upp á 123,0 mió. kr. og rentuútreiðslum netto upp á 31,6 mió. kr. Øktu rentuútreiðslurnar stava frá øktum íløgum og skuld hjá felagnum til at fíggja rakstur og íløgur.

Við einum ætlaðum yvirskoti upp á 81,3 mió. kr. fyri 2019 áðrenn skatt og 66,6 mió. kr. eftir skatt, verður gjaldførisbroytingin frá rakstrinum ætlað til 240,2 mió. kr. Gjaldførið við ársenda 2019 verður ætlað til 198,2 mió. kr.

Skal felagið framhaldandi gera neyðugar íløgur fyri at menna og viðlíkahalda net og framleiðsluverk eins og at fremja íløgur í útbygging av varandi orkukeldum, er neyðugt, at felagið hevur eina nøktandi sjálvfígging frá rakstrinum. Við einari nøktandi sjálvfígging er felagið ført fyri at halda eitt nøktandi gjaldføri, ið er ein fyritreyt fyri at útvega fígging frá lánveitarum til tær stóru íløgurnar, sum standa fyri framman komandi árini.

Ætlað verða fíggjarligu lyklatølini nettoskuld í mun til EBITDA 6,0 ferðir og eginpeningsparturin 43,4%. Við hesum er SEV aftur innanfyri mest loyvd innanhýsis áseting og væl innanfyri mest loyvdu áseting frá fíggjarveitarunum fyri lyklatølini.

Nærri lýsing av 2019 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2019 á www.sev.fo.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Elfelagið SEV er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár, víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

### Vørunýtsla

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin av netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin av netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum.

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er ein partur av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum á Sunds- og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

SEV hevur mett, at ein eginfígging uppá 25% er nøktandi, og hevur í roknskapinum tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslu- og netpartin.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5 ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið uppá 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur umframt eina eginfígging uppá 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

## Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

## Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

## Fíggjarpostar

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýtið verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum feløgum

Í rakstrarroknskapi móðurfelagsins verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

# FÍGGJARSTØÐAN

## Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu og býtisvirkir | 10-50 ár | 0 % |
| Bygningar | 50 ár | 0 % |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

## Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur aftrat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virðið av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

## Kapitalpartar í atknýttum feløgum

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá feløgunum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognini í atknýttum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

## Kapitalpartar í assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, við einari lánitíð á 3 mánaðir sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

## Aðrar avsettar skyldur

Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við, at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

## Avleidd fíggjarlig amboð

Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað aktiv ella passiv. Dagsvirði av einari trygging verður roknað sum langfreistað aktiv ella passiv, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað aktiv ella passiv, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

## Gjaldføristrygging

Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

## Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni soleiðis, at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld sum viðvíkja inntøkum komandi árini.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkum peningi við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnum skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postum.

Pengingastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittar.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010".

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Renting av eginogn | Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100 / Miðal eginogn |
| Ognaravkast | Úrslit av primerum rakstri x 100 / Miðalvirði av aktivum |
| Nettoskuld/EBITDA | Nettoskuld (skuld – tøkur peningur) / EBITDA |
| Ognarumferð | Nettoumsetningur / Aktiv tilsamans |
| Eginognarpartur | Eginogn ultimo x 100 / Aktiv tilsamans |



# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

| Nota | | Samtak | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2018<br>DKK | *2017*<br>*t. DKK* | 2018<br>DKK | *2017*<br>*t. DKK* |
| 1 | Nettosøla | 427.459.938 | *432.277* | 407.997.666 | *411.910* |
| 2 | Oljuútreiðslur | -105.771.305 | *-84.741* | -105.771.305 | *-84.741* |
| 3 | Tilfar og tænastuveitingar | -50.391.190 | *-53.902* | -44.893.375 | *-48.862* |
| | **Bruttoúrslit** | **271.297.443** | ***293.634*** | **257.332.986** | ***278.307*** |
